Síða 12

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 373 Hósdagur 10. august 2006 15,-



Nýggi Beinir:

# Reiðarin er 82 ár


100% tryggleika?



Ti velja
fleiri og fleiri
maskinmeistarar
Mobil smyrjiolju!

Mobil Oil Føroyar

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo




# Jóhanna Mathea 100 ár

Fødd á Trøllanesi og gjørdist borgmeistarakona í Havn

Síða 9


Køliskipanir til skip, ídnað & handlar
Hitapumpur · Prosjektering · Montering

SUNWELL




ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 · tel 35 12 20 · www.lm.fo


Sjómannadagur 2006:

Síða 18

# Hullskipari undir Føroyum

Skjalprógv:

# Toll og Skatt hevur hildið upplýsingum aftur í kærumáli

Bárður Nielsen hevur ábyrgdina av mannagondini

Síða 4


KÄRCHER



Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspulanum til ídnað.

Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42




Síða 21

Andrias gjørdi eitt bragd:

# Bjargaði skipsfelaga

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf. 311569 · fax: 319769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prentfyrireiking: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin
- kemur út annanhvønn hósdag

# Óskar Jensen 100 ár

**Sum lesarum okkara kunnugt, verður Óskar Jensen 100 ár tann 18. august. Vit hava umrøtt Óskar í blaði nr. 369, og fara vit at vísa til hesa frásøgn, sum eisini finst á okkara heimasíðu.**

Vit fara bert at skoyta uppí, at heilt tilvildarligt kom sonur Óskar saman við konuni til Føroyar at ferðast beint eftir, at henda grein var skrivað. Hetta gav honum eitt serligt høvi at fáa innlit í forsøguna hjá pápanum. Umframt at vitja ætt í Føroyum hitti hann eisini Askham-ættina. Tað var hjá Julionnu og Tummas Askham, Óskar kom at búgva meginpartin av tíðini í Føroyum, eftir at sonurin, Símun, hevði tikið hann heim við sær. Tey hjá Askham tóku Óskar til sín, sum um hann var teirra egni.

Hesum fekk Ómar eisini prógv fyri, tá hann sá eitt ættaryvirlit, sum var gjørt til eina ættarsamkomu hjá Askham-ættini fyri nøkrum fáum árum síðani. Her var Óskar roknaður uppí ættina nærum 80 ár eftir, at hann var farin aftur til Íslands!

Føðingardagurin verður hildin á røktarheiminum, har Óskar er, og har vænta tey, at teir flestu av eftirkomarunum hjá Óskar koma. Adressan er: Hrafnista, Vífilstaðir, Garðarbær, Ísland.

Ómar hevur annars hoyrt um abba sín, Jens Fredrik Jensen, ættaður úr Skopun, at hann var ein dugnaligur fiskimaður í síni tíð. Hann vildi altíð vera einsamallur á báti, men fiskaði kortini minst líka nógv einsamallur sum aðrir bátar, har tað vóru tveir mans við.

Vit vilja ynskja Óskari hjartaliga til lukku við teimum 100 árunum!



*Hetta ein "mini-samkoma" millum ættirnar hjá Símun Askham og Óskar Jensen.*
***Aftanfyri f.v.:*** *Ómar, John Justinussen, giftur við Beggu, Hans Havid Johansen, giftur við Marthu og Jonna, dóttir Beggu.*
***Frammanfyri:*** *Olivia, kona Ómar, Begga, Martha og Sonja, døtur Onnu og Símun Askham.*



*Henda myndin er frá 1994. Frammanfyri sita f.v. Óskar, Anna Júlia, Malfríður og Hansina, kona Óskar. Aftanfyri eru trý barnabørn og Ómar.*




P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 5
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311909
E-mail: sveising@post.olivant.fo



KOKKAR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir kokkum til Norrönu at byrja skjótast gjørligt

Smyril Line bjóðar áhugaverd og avbjóðandi starv sum kokkur í einum altjóða umhvørvi har lyklaorðini eru:

· Ábyrgd
· Persónlig avbjóðing
· Dygd
· Faklig menning
· Persónlig menning

Smyril Line søkist eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

Heilsuprógv fyri sjófólk krevst (ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Løn og setanartreytir eru smb. galdandi sáttmála undir FAS-skipanini við Føroya Fiskimannafelag

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Umsóknir og CV skulu sendast við teldupósti til aðra av hesum tilskriftum:

crew@smyril-line.fo
hotelmanager@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveis, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 345900 · FAX 345950 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Sailor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad. Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satelitte Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

Søla og service:
Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SYN og Service, sum vit eisini gera

Sp/f Contrive Jsp Ltd.
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# Vegleiðing til okkara fiskimálaráðharra

Eyðstein Poulsen

Fyrst av øllum vil eg takka tær fyri, at tú gevur tær tíð til okkum, sum eru umfataði av (fiskivinnu) lóggávuni.

Eg havi varhugan av, at landsstýrismaðurin hevur misskilt míni sjónarmið, samstundis sum hann letur eyguni aftur fyri veruleikanum. Hetta seinna er heldur meira álvarsamt.

Eg helt ikki, at nakar fór skeivur av mínum sjónarmiðum, tá ið eg skrivaði yvirskriftina: ...ósigur fyri "SMÁU" reiðaríini. Tú málar beinanvegin svart og hvítt í tínum aftursvari. Eg skilji tín meting er, at um okkara fiskiloyvir hava høgan marknaðarprís. Ja, so er alt gott. Vit smáu hava ikki havt størsta áhuga í okkara søluvirði. Tað, sum hevur ligið okkum á hjarta, er at svara hvørjum sítt, og tað er hetta, sum nú svíður, men sum tú sigur og staðfestir í tíni viðmerking: Stórveldisrákið, sum hevur verið um heimin; ja, tað hevur nú svølgt okkara fiskimálaráðharra.

Høgi marknaðarprísurin, sum er í dag fyri fiskiloyvir, er ikki íkomin, tí dugnalig fólk síggja stórt í fiskivinnuni, men hinvegin tí peningastovnarnir eru so væl fyri, at teir mestsum lána í eyst og vest. Lat meg siga tað einaferð enn, tað vera ikki hesi dugnaligu fólkini, sum koma at rudda upp eftir sær, tá ið pengakistan er tóm.

Hyggja vit so eftir, hvør selur og hvør keypir fiskiloyvir í dag. Ja, so kann landsstýrismaðurin ikki vera ósamdur við mær í, at Føroyar skjótt vera tómar fyri smáum reiðaríum, um verandi gongd heldur áfram. Og tað sýnist ikki sum um, at politikararnir síggja álvaran í hesum, men hinvegin lata eyguni aftur fyri vandanum.

Tá ið føroyingar fóru á knøini fyrst í nítiárinum eftir ósigurin hjá teimum stóru, vóru tað teir smáu, sum fingu landið á rætt kjøl aftur. Eitt orðatak sigur: "har ein ikki er sjálvur, er ein bara hálvur". Hetta er vanliga tað, sum kollsiglir eina stóra fyritøku. Ein missir tamarhaldið, tí hjartað ikki er við hvørjum smáluti.

Haldi tað vera sera vandamikið, at politikara við báðum hondunum fyri eyguni leypa glaðbeintir út í nútíðarrákið.

Hvat skulu vit hava stýrið til, um rákið skal avgera okkara framtíð?

Tað, sum harmar meg mest, er, at fiskimansins vitan um okkara vinnu fær so lítla ávirkan, tá ið stóru spurningarnir taka seg upp. Hetta, tí akademikarar og veiðufólk ikki tosa sama mál.

Góði Bjørn, lat ikki grundleysar teoretikarar koyra alt samfelagið fyri bakka, fyri so fátækslig orð sum nútíðarrák og søluvirði. Hvørki av hesum kemur at breyðføða okkum føroyingar, tá ið "veitslan" er runnin.

# Íslendski toskastovnurin minkar so spakuliga

Sum kunnugt føra íslendingar seg fram við, eftir teirra tykki, heimsins bestu fiskiveiðuskipan. Men ikki tess minni er tilmælið hjá fiskifrøðingum um toskaveiðu minkandi fyri hvørt ár, sum gongur. Í Fiskifréttir var herfyri ein uppgerð yvir gongdina seinastu árini, og vísir tað hesi tølini fyri tilmælini um toskaveiðuna:

| | |
|---|---|
| 2003/04 | 209.000 t |
| 2004/05 | 205.000 t |
| 2005/06 | 198.000 t |
| 2006/07 | 187.000 t |

Hetta er ein minking uppá 11% bert eftir trimum árum, og tilráðingin hjá fiskifrøðingunum hevur neyvan nakrantíð verið so lág. Tey fyrstu av hesum trimum árunum er kvotan eisini sett samb. tilráðingini, men fyri komandi fiskiár er ikki heilt lurtað eftir fiskifrøðingum, tí kvotan er sett til 193.000 t.

Hetta sigur kanska nakað um, at toskur kann vera eitt sindur óútrokniligur í Íslandi eisini.

Annars fylgir gongdin í Íslandi nakað henni, sum er í Føroyum við høvuðsbotnfiskasløgini. Fyri hýsu er tilmælið í sama tíðarskeiði farið úr 75.000 t í 95.000 t og kvotan er 105.000 t. Upsin er farin úr 50.000 t upp í 80.000 t.

Sildin er farin úr 110.000 t í 130.000 t. Lodnukvotan er null, meðan hon var ein millión tons fyri bert tveimum árum síðani, so her er ein stór broyting.

Um vit hyggja at lutfallinum í Íslandi millum tosk og upsa, kann hetta geva okkum eina mynd av muninum millum fiskiskapin hjá hesum báðum londum. Í Íslandi er tann dýri toskurin avgjørt høvuðsfiskaslagið, meðan tann bíligi upsin er munandi minni í nøgd og ikki at tala um í virði. Hjá okkum er tað beint øvut.

Hetta er sigur heilt nógv, soleiðis sum vit eisini áður hava víst á.

# Uppskotið hjá tjóðveldisflokkinum um sølu av fiskirættindum

Tað er sjálvsagt at fegnast um, at ein flokkur arbeiðir við at bøta um ta skipan, sum er galdandi fyri fiskiskapin undir Føroyum. Tjóðveldisflokkurin eigur tí eisini tøkk fyri teirra íkast, sum varð lagt fram alment undan ólavsøku.

Sum vit skilja, er hugskotið aftanfyri, at eftir einum 10 ára skeiði skulu øll fiskirættindini fella aftur til landið. Síðan skulu tey seljast aftur í smáum til teir, sum vilja gjalda mest fyri tey. Í smáum merkir, at rættindini skulu bert seljast fyri eitt styttri tíðarskeið, hvat enn liggur í hesum orðinum.

Vit hava fyrr ásannað, at vit eru komin út á eina glíðibreyt, tá tað skal bera til at selja fiskirættindini fyri óhoyrdar milliónaupphæddir. Tað mugu finnast mátar at loysa hendan spurning. T.d. við at áseta, at fiskirættindini als ikki kunnu seljast. Verða tey ikki brúkt, falla tey aftur til tað almenna.

Vit duga illa at síggja, at fyriliggjandi uppskot skal kunna loysa nakran trupulleika á hesum økinum. Hetta minnir ov nógv um teoretikarar, sum hava verið frammi við tí sama.

Hetta uppskotið merkir fyri tað fyrsta, at menn skulu gjalda fyri at sleppa at fiska, og hetta er ikki ein hugburður, sum vit taka undir við. Vit duga heldur ikki at síggja, hvussu tað skal kunna bera til bert at geva einum skipi fiskiloyvi fyri eitt sera avmarkað tíðarskeið. Hvat so við tí skipi og teirri manning, sum knappligur liggur uttan loyvi?

Hetta eru bert tveir av spurningunum í samband við hetta uppskot. Um tað skal kunna vera partur í eini breiðari politiskari loysn, skulu vit ikki kunna siga. Men tað er ein breið loysn, vit hava brúk fyri. At fáa hana, hevur øll tann politiska skipanin ábyrgd av at fáa til vega.


AGN

sild
tobis
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur



...dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR

telefon: 448095 - fax: 448744



Vit hava útgerðina



Flótitrol · Snurpunótir
Botntrol · Aliútgerð
Rækjutrol · Annað

VÓNIN

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

Tórshavn:
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 354391
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com



Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

## Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA, verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 29. aug. 2006 og á Landssjúkrahúsinum 30. aug. og 1. sept. 2006.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 45 45, mánadag og týsdag kl. 10 - 12, í seinasta lagi týsdagin 22. aug. 2006.

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



**Skattakærunevndin:**

# Endaligu prógvini á borðinum

**Nú hevur fiskimannafelagið sjálvt útvegað ta endaligu prógvførslu um skatting av fiskimonnum við saltfiskalínuskipum, sum Toll og Skatt varð biðið um, uttan at røra ein fingur.**

Vit hava havt fleiri greinir um tað skattamál, sum vit hava havt við Toll og Skatt og seinni í almennu kæruskipanini. Vit hava gjørt nógv burtur úr at lýsa hetta mál, tí tað er eitt sera gott dømi um, hvussu okkara politiska- og umsitingarliga skipan virkar við atliti at rættartrygdini hjá vanliga borgaranum. Ein onnur orsøk til at kunngera tilfarið í málinum er, at gera tað ómøguligt hjá kærunevndini at avvísa at taka málið upp aftur, grundað á at einki nýtt er framkomið í málinum.

Tað seinasta, sum er hent í hesi sak, er, at almenna kærunevndin í skatta- og avgjaldsmálum gav Toll og Skatt fult viðhald m.a. við hesi grundgeving:

*Ósemja er partanna millum, hvør siðvenjan hevur verið viðvíkjandi skatting av vistarhaldi, og skjølini, sum eru løgd fram, verða ikki mett at vísa, at Toll- og Skattstova Føroya hevur góðkent, at sjómenn fáa frádrátt fyri kost, sum teir sjálvir hava rindað.*

**Hvør hevur próvbyrðina?**

Hetta reisir tann sera prinsipiella spurning, hvør tað er, sum hevur próvbyrðina í einum skattamáli, har tað snýr seg um rættindini hjá borgaranum. Er tað borgarin ella myndugleikin? Í okkara verð er eingin ivi um, at í einum rættarsamfelagi má ta vera myndugleikin, sum hevur próvbyrðina, tá rættindi verða tikin frá borgaranum.

Í hesum máli er tað greitt, at einasta tilfar, sum er lagt fram, kemur frá Føroya Fiskimannafelag. Toll og Skatt hevur ikki framlagt so mikið sum eitt skjal, sum undirbyggir teirra sjónarmið um siðvenju á økinum. Sjálvt eftir áheitan frá kærunevndini hava teir ikki lagt fram so mikið sum ein bókstav. Teirra fremsta uppgáva hevur verið at grugga málið, fyri at tað ikki skal kunna verða lýst til fulnar. Tað er eisini alt, sum bendir á, at teir hava afturhildið upplýsingum, sum kundu gagnað okkara sak.

Hetta hevur loyst seg. Okkara prófførsla er sópað av borðinum, hóast hon kundi havt verið váttað av Toll og Skatt, um teir kannaðu málið. Hetta skuldi verið teirra skylda undir øllum umstøðum. Sjálvt eftir, at teir av kærunevndini vóru bidnir um at gera nærri kanningar av, hvussu menn við saltfiskalínuskipum vóru skattaðir, hava teir ikki rætt hond frá síðu, hóast alt tilfar á hesum økinum er tøkt.

Framhald á næstu síðu



*Hetta er avrokning fyri "Havørnina" í 1962. Sum tað sæst er avrokningin kr. 2.039 eftir frádrátti av provianti. Hetta er tann upphædd, sum Óli Jacobsen fekk útgoldna fyri hendan túrin.*




*Við árslok 1962 gevur reiðarin upp, hvat hvør fiskimaður hevur forvunnið. Henda uppgávan verður send bæði til løntakaran sjálvan og í hesum førinum til kommunustýrið í Gøtu sókn, sum stendur fyri álíkningini.*

*Sum tað sæst, er uppgivna inntøkan kr. 2.039. Afturat hesum verður upplýst, at givin er "vist umborð í skipi í 3 mánaðir". Samb. tí sum Toll og Skatt nú førir fram, skuldi manningin verið skattað av kr. 2.709,60, t.v.s. áðrenn frádrátt av provianti. Spurningurin er tískil, hvat hald ið er í hesum pástandi.*

**Brævið til kærunevndina:**

## Útgreining av tilfarinum

Vit hava framhaldandi kannað siðvenjuna í hesum máli og senda hjálagt meira tilfar, sum váttar okkara frágreiðingar.

Hetta er gjørt út frá mínum egnu viðurskiftum. Eg var sjálvur við saltfiskalínuskipum í 1962 og 1964, sum er bæði beint áðrenn og beint aftaná broytingina í skattalógini í 1963.

Eg havi útvegað tað tilfar, sum er um mína skatting hesi bæði árini, og gevur hetta tilfar fulla lýsing av, hvussu henda fór fram. Her skal verða givin ein frágreiðing um hesi árini hvør sær.

**1962**

Hetta ár var eg, umframt í øðrum arbeiði, ein saltfiskatúr við línuskipinum "Havørnini".

Avrokning er hjáløgd (skjal 1). Her sæst, at tað, sum eg fekk burturúr, var kr. 2.039,42 eftir frádrátti av provianti.

Við árslok 1962 gevur reiðarin skattskyldugu inntøkuna upp (skjal 2). Sum tað sæst, er tað umrødda upphædd, kr. 2.039,42, sum verður uppgivin.

Samstundis verður uppgivið, at eg havi havt vist umborð í 3 mánaðir.

Næsta stig er so at geva upp í skatt. (Skjal 3) Tað verður gjørt samb. lønaruppgávunum frá arbeiðsgevarum, íroknað nevndu kr. 2.039,42 fyri umrødda túr.

Afturat hesum gevi eg upp fyri "ókeypis vist á skipi" kr. 360, sum er kr. 40 pr. mánað í 9 mánaðir.

**Her skal býtast merki í fylgjandi:**

Tað er greitt út frá hesum, at virði av vistarhaldi samb. teksti í sjálvuppgávuni verður roknað sum "ókeypis vist" uttan mun til sáttmálan. Eftir at hava verið avroknaður umrøddu kr. 2.039,42, er vistarhaldið jú goldið og er eftir hetta at rokna sum "frítt". Tískil er hetta eitt dømi um, at skattamyndugleikin hevur góðkent okkara definitión av einum fiskimannaparti, nevniliga tað, sum fiskimenn fáa útgoldið eftir teir í sáttmála ásettu frádráttir.

Eisini skal verða lagt til merkis, at skattaða virðið av vistarhaldinum ikki samsvarar við veruligu útreiðslurnar/-frádráttirnar. Trektar eru kr. 8,17 pr. dag í kosti ella kr. 245 um mánaðin, men tað, sum verður skattað, er kr. 40. Tískil er tað bert ein lítil partur av virðinum av vistarhaldi, sum verður skattaður.

Men hetta var í hvussu er ein skipan, sum javnsetti allar fiskimenn uttan mun til sáttmála.

Aftaná ymiskar frádráttir er mín skattskylduga inntøka fyri 1962 kr. 8.176.

Síðan kom vit til skattlistan í Gøtu. (Skjal 4) Her standi eg til at hava uppgivið kr. 8.176, og hetta er eisini "ætlað inntøka" t.v.s. góðkent at skattavaldinum, og verði eg skattaður av hesum.

**1964**

Í 1963 verður m.a. gjørd tann umrødda broyting í skattalógini, at sjómenn ikki longur skulu skattast av vistarhaldi umborð.

Í 1964 er eg tveir saltfiskatúrir við línuskipinum "Grími Kamban" hjá Poul Hansen. Tað kann verða nevnt at teir vóru undangongumenn við línubátum og høvdu tá tríggjar bátar í hesi vinnu og hava vitað hvussu tað skuldi avroknast.

Eg leggi hjá avrokningarnar fyri hesar túrar (skjal 5 og 6). Sum tað sæst, er her avroknað á sama hátt sum við "Havørnini" í 1962. T.v.s. inntøkan er parturin eftir frádrátti av provianti.

Við ársbyrjan 1965 gevur reiðaríið upp til skattingar (Skjal 7). Sum tað sæst, verður uppá oyra uppgivið tað, sum avrokningarnar geva aftaná frádrátt av provianti.

Men nú er hend tann broyting, at uppgávan av vistarhaldi er strikað, og er hetta ein avleiðingin av umrøddu skattalógarbroyting, sum merkir, at henda "fiktiva" inntøkan er strikað.

Uppgivin er mynstringartíð, men hetta er í sambandi við tann fiskimannafrádrátt, sum varð settur í gildi við somu løggávu.

Úr frá hesum verður givið upp í skatt fyri 1964 (Skjal 8). Eftir frádráttir m.a. fyri sjóklæðir og fiskimannafrádrátt verður skattskylduga inntøkan sett til kr. 7.390.

Síðan koma vit til skattalistan. Her sæst eisini, at eg eri settur bæði í kommunu- og landsskatt av teirri uppgivnu inntøkuni.

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA




Útfyllingarblað til [illegible]álvuppgávu.

Navn: Oli Jacobsen

Yrki: Fiskimaður

Inntøka bókførd í góðkendum handilsbókum:

Aðrar inntøkur:

3. b. [illegible] 9500 kr.

d. Ókeypis vist á skipi í 9 mánaðir á 40 kr. 360 kr. 9850 kr.

Hetta er sjálvuppgávan fyri 1962. Her er uppgivin samlaða inntøkan fyri árið, íroknað umrøddu kr. 2.039, sum er inntøkan frá túrinum við "Havørnini".

Afturat hesum verður ført sum inntøka: "Ókeypis vist á skipi í 9 mánaðir á kr. 40", og gevur hetta kr. 360, sum verður lagt afturat inntøkuni. Við í hesum 9 mánaðum eru teir 3 mánaðirnir við saltfiskalínuskipi.

Aftaná frádráttir uppá kr. 1.684 er kr. 8.176 eftir til skattingar. Síðan er til skjals skattalistin í Gøtu, har tað kann staðfestast, at júst henda upphædd er komin til skattingar.

Tá vit so koma til 1964 er einasta broyting, at inntøkuteigurin fyri "ókeypis vist" var strikaður. Skattingin av inntøkunum er tann sama sum í 1962, t.v.s. eftir frádrátt av provianti.

Júst hetta er sera avgerandi í málinum. Ein høvuðsgrundgeving hjá Toll og Skatt í hesum máli hevur verið, at reglan í skattalógini um, at skattur ikki skal gjaldast av virðinum av vistarhaldi, er ikki galdandi fyri sáttmálar, har manningin verður trekt fyri allan proviantin. Í slíkum føri er ikki talan um eitt "virði". Tí er lógarásetingin bert galdandi fyri sáttmálar, har provianturin er "fríur", og tað er eitt "virði" at síggja burtur frá.

Hinvegin hava vit víst á, at ein sáttmáli er ein háttur at rokna út ein part. Hann er grundaður á frádráttir og prosentpart til manningina, men úrslitið verður grundleggjandi tað sama. Tí má skattingin fara fram eftir somu reglum.

Tað, sum hevur týdning, er, hvat ið verður útgoldið samb. sáttmálan. Tað hevur eisini verið hetta, sum hevur verið grundarlagið fyri útrokning av minstuløn, sum vit áður hava víst á.

Her síggja vit, at tað er júst okkara sjónarmið, sum hevur verið grundarlagið fyri sjálvuppgávuni. Hjá øllum fiskimonnum verður kosturin av skattavaldinum mettur at vera fríur, eisini í hesum sáttmálanum. Hetta hevur verið galdandi heilt frá 1953, og tað vit vita um heilt fram til ár 2.000 ella í nærum hálva øld.

Tað skal eisini skoytast uppí, at tað er júst henda sjálvuppgávan, sum hevur verið grundarlagið fyri skattingina, tá skattalógin varð broytt í 1963, og hesum hava politisku myndugleikarnir sjálvsagt vitað av. Her er heldur ikki bert talan um nakrar fáar fiskimenn, sum ikki telja við í siðvenjuni. Júst um hesa tíðina var hetta helst tann mest vanligi sáttmálin hjá fiskimonnum. Tað er so avgjørt einki, sum bendir á, at nøkur sum helst ætlan hevur verið um aðra broyting enn, at fiskimenn ikki skuldu gjalda skatt av provianti. Tað skal skoytast uppí, at her er einki farið fram, sum eingin hevur vitað um. Landsstýrismaðurin aftanfyri hesa umsiting, Erlendur Patursson, hevði sjálvur sum formaður í FF gjørt tann sáttmála, sum nú tvídráttur er um hálva øld seinni.

Her kann verða skoytt uppí, at í eini grein, Erlendur skrivar í floksblaðnum 14. September, aftaná lógarbroytingarnar í 1963, skrivar hann m.a.: "...vistarhald umborð verður ikki skattað."

Hetta tileinkisger fullkomiliga umrødda sjónarmiðið hjá Toll og Skatt. Hóast 10.000-undir av líknandi sjálvuppgávan liggja í skjalagoymslum teirra, so hava teir einki tilfar funnið, sum kann lýsa siðvenjuna á hesum øki! Teir hava í hvussu er ikki lagt tað fram.

Tað er á hesum "grundarlagi", at kærunevndin hevur tikið sína støðu!


m.s."[illegible]" 1.saltfisketúr 5/4 - 9/7 - 1964. - [illegible] dagar.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 140.907 | kg saltfiskur | No.1 á £ 100.0.0. = 1/930 | ... | Kr. | 271.170.51 |
| 4.170 | - | No.1 - £ 65.0.0. = 1/254 | .... | - | 5.231.26 |
| 5.970 | - | No.2 - £ [illegible].0.0. = 1/775 | .... | - | [illegible].09 |
| 619 | - | No.2 - £ 65.0.0. = 1/254 | .... | - | 776.54 |
| 3.096 | - | No.3 - £ 60.0.0. = 1/150 | .... | - | [illegible].17 |
| 153.962 | kg | | | Kr. | 290.661.57 |
| 1.233 | - [illegible] | | ........ | - | 3.082.50 |
| 65 | [illegible] | | ........ | - | [illegible] |
| | | | | Kr. | 308.902.69 |
| | | + [illegible] | ........ | - | [illegible] |
| | | | | Kr. | 29[illegible].79 |

[illegible] 3½% = Kr. 92.667.95

at býta í 24 partar ........ Kr. 3.861.16

provianturin Kr. 18.886.53

at býta í 27 partar ........ - 699.50

Kr. 3.161.66

*Hetta er avrokning fyri 1964 eftir broytingina í skattalógini. Tað er somuleiðis skjalprógvað, at her er skattur goldin av teimum kr. 3.161,66, sum eru eftir aftaná frádrátt av provianti, og soleiðis eru allir saltfiskatúrir skattaðir fram til seinasta túrin í 1995.*

Framhald av síðu 4

Síðan hendir tað ótrúliga, at júst hetta er komið teimum til góðar í tiknu avgerðini hjá kærunevndini!

Hetta meta vit vera sera prinsipielt. Í einum skattamáli sum hesum er tað almenni myndugleikin, sum liggur inni við próvtilfarinum. Skal tað vera borgarin, sum skal geva eina fulla próvørslu um sín rætt, hevur hann snøgt sagt ongan møguleika. Tá eru vit sera tætt við einum rættarloysi.

**Útvegaði egnar sjálvuppgávur**

Orsøkin til, at hetta mál er komið so langt, er lutvíst tí vit vita, at vit hava rætt í hesum máli. Og tá vit vita, at vit hava rætt, sleppa vit ikki einum máli sum hesum.

Tað arbeiðið, sum Toll- og Skatt ikki hevur gjørt, hóast umbøn frá kærunevndini, hevur FF nú gjørt eisini grundað á tilfar, sum vit hava útvegað hjá Toll- og Skatt. Vit hava longu umrøtt ein part av hesum tilfari. Tað snýr seg fyrst og fremst um siðvenjuna á økinum, sum vísir, hvussu mannagongdin hevur verið við skatting av hesum fiskimonnum.

Í hesi grein kunnu vit enn einaferð undirbyggja okkara støðu við framløgu av meira prógvførslu.

Formaðurin í FF hevur nevniliga siglt við saltfiskalínuskipum, sum er tann sáttmálaháttur, sum málið snýr seg um. Hann var við slíkum skipi í 1962, t.v.s. áðrenn skattalógarbroytingina í 1963, sum ásetti, at fiskimenn ikki skuldu gjalda skatt av vistarhaldi. Síðan var hann aftur við línuskipi í 1964, t.v.s. aftaná umrøddu lógarbroyting. At sammeta skattingina hesi bæði ár sigur greitt, hvussu skattingin er farin fram, og harvið hvussu siðvenjan hevur verið.

Fyri at fáa til vega próvtilfar, sum Toll og Skatt hevur undir hond, men sum teir ikki hava viljað lagt fram í málsviðgerðini, bað Óli Jacobsen um at fáa innlit í sína egnu skatting fyri umrøddu ár.

Hetta eydnaðist og saman við avrokningum í skjalasavninum hjá FF kann nú endiliga skjalprógvast, hvussu skattingin er farin fram. Hetta tilfar váttar eina einaferð tað, sum vit annars hava ført fram.

Hetta gav høvi til frágreiðingina til kærunevndina (á síðu 4).

## Bárður hevur ábyrgdina

Tað er eingin ivi um, at tann sum hevur beinleiðis ábyrgdina av mannagongdini hjá Toll og Skatt er landsstýrismaðurin á økinum, og er hann í løtuni Bárður Nielsen. Hann kann sjálvsagt ikki leggja seg út í einstøk skattamál, men hann hevur ábyrgdina av, at í slíkum málum er ein skipað mannagongd, sum tryggjar at avgerðir verða tiknar á einum dyggum grundarlagi.

Hetta mál prógvar at skipað mannagongd finst ikki. Einasta "prinsipp" við "málsviðgerðini" á Toll og Skatt hevur verið at grugga grundarlagið fyri viðgerðini fyri at tryggja sær, at stovnurin kundi fáa viðhald í kærunevndini. Hetta hevur fyrst og fremst verið gjørt við at afturhalda upplýsingum í málinum, sum tað er prógvað í hesi grein, og at koma við óundirbygdum pástandum, sum vit hava kunnað afturvíst.

Hetta skuldi als ikki kunna borið til í einum rættarsamfelag. Men hjá okkum er hetta ein skipaður politikkur hjá Bárði, sum er fullkomiliga greiður yvir hetta, men tykist ikki at látast um vón. Men hetta frítekur hann ikki fyri ábyrgdina!

Niðurstøða:

## Fiskimannafelagið hevur rætt

Við tí tilfari, sum vit nú hava lagt fram í hesum máli, er avgjørt eingin ivi um søguna aftanfyri hetta mál og um siðvenjuna á økinum. Hetta samsvarar nevniliga eisini við tað tilfar, m.a. avrokningar, sum vit annars hava lagt fram. Millum avrokningarnar er eisini tann seinasta avrokningin hjá línuskipinum Borðoyanes á saltfiskaveiðu í 1995. Tískil er eingin ivi um siðvenjuna frá 1953 til 1995 ella í meira enn 40 ár.

Hetta váttar til fulnar tað, sum vit hava ført fram frá fyrsta degi, og sum tað eisini er váttað av fyrrverandi starvsfólki á stovninum.

Samstundis er hetta ein fullkomilig undirkenning av tí, sum Toll og Skatt hevur ført fram um, at eingin siðvenja er broytt. Hetta er eisini ein tileinkisgering av teirri grugging og tí iva, sum hevur verið sáddur um okkara prógvførslu í málinum. Hetta er hent, samstundis sum Toll og Skatt ikki hevur lagt fram eitt einasta skjal í hesum máli. Tað, sum vit nú hava funnið fram til, er júst tann uppgávan, sum Toll og Skatt fekk á fundinum hjá skattakærunevndini 10. mai, men sum teir einki gjørdu við, hóast teir enn lættari enn vit høvdu kunnað lýst hetta mál.

Tískil kann tað enn meira greitt staðfestast, at avgerðin hjá kærunevndini er tikin á mangulfullum grundarlagi.

Annars verður víst til tað, sum vit áður hava ført fram í hesum máli.

# Løgmaður á ólavsøku

**Vit endurgeva her brot úr ólavsøkurøðuni hjá løgmanni, sum vit meta hava serligan áhuga fyri fiskimenn og verkafólk annars.**

**Arbeiðsloysið**
Í februar 2005 var arbeiðsloysið tað mesta síðan aldaskiftið, tá ið yvir 1.200 fólk vóru fulltíðararbeiðsleys. Støðan batnaði síðan fram til juni 2005 og stóð so við fram til januar í ár, tá ið hon batnaði enn meira. Í mai vóru 792 fulltíðararbeiðsleys. Hetta eru 29 færri enn í apríl og 104 færri enn í mars. Arbeiðsloysisprosentið minkaði samsvarandi úr 3,1% í mars niður í 2,8% í mai.

Yvirhøvur eru færri mannfólk arbeiðsleys enn konufólk. Árstíðarjavnaða arbeiðsloysið hjá mannfólki var 2,0% og hjá konufólki 3,7. Mesta arbeiðsloysið hevur seinastu fimm árini verið í Suðuroy, men frá apríl til mai fór arbeiðsloysið í Norðuroyggjum upp um, úr 3,9 upp í 4,1%. Í Suðuroy minkaði tað úr 4,2 niður í 4,0. Har er tað serliga minkað hjá konufólki, niður í helvt eftir einum ári. Í mai var tað komið niður á 6,2%, sum er minni enn hjá konufólki í Norðuroyggjum, har tað var komið upp á 6,5.

Føroyska arbeiðsloysið er niðan fyri 3%, og tað er lítið samanborið við flestu Norðurlond. Í Íslandi er tað 1,6%, í Noregi 3,8, í Danmark 4,5, í Svøríki 4,9 og í Finnlandi 7,8. Í ES er arbeiðsloysið í miðal 8,6.

**Brúkaraprístal**
Fyrsta ársfjórðing í ár vóru brúkaraprísirnir í miðal 0,9% hægri enn somu tíð í fjør, og annan ársfjórðing í miðal 2,2% hægri. Hetta er fittur vøkstur, men samanumtikið hevur inflasjónin verið tann sama sum í hinum Norðurlondunum, ið ikki hava stóra inflasjón. Tá er Ísland ikki uppítalt.

Árligi prísvøksturin hevur verið størstur í høvuðsbólkunum flutningi (4,7%), býli (3,8), rúsdrekka og tubbaki (3,5) og mati og drekka (2,8). Príslækkingin hevur verið mest í høvuðsbólkunum frítíð og mentan (-1,6) og innbúgvi, húsbúnaði o.tíl. (-1,5).

Teir nýtslubólkar, sum hava ávirkað brúkaraprístalið mest uppeftir seinasta árið, eru brenni-olja til húsarhald (+1,14 prosentstig), brennievni til akfør (+0,43), tubbak (+0,23) og kjøt (+0,24). Bólkarnir, sum hava ávirkað talið mest niðureftir, eru undirbólkarnir rentuútreiðslur fyri íbúðalán (-0,67) og frítíðarferð uttanlands (-0,22).

Frá fyrsta til annan ársfjórðing vaks brúkaraprístalið 1,6%, úr 104,5 upp í 106,2. Størsta orsøkin eru býlisútreiðslur og hægri prísir á brennievni og matvørum. Prísvøksturin í nýtslubólkinum býli hevur í miðal verið 4,5%, og rentan á íbúðalánum er hækkað 6,4%. Hetta hevur ávirkað brúkaraprístalið 0,31 prosentstig uppeftir. Prísurin á brenniolju til húsarhald er hækkaður 8,3% (+0,47), viðlíkahald av bústaði er hækkað 2,1% (+0,06), og húsaleiga er hækkað 2% (+0,05). Prísurin á brennievni til akfør er hækkaður 7,3% og hevur ávirkað brúkaraprístalið 0,24 prosentstig uppeftir. Prísirnir á mati og drekka eru hækkaðir 1,1% seinasta ársfjórðingin. Hetta hevur ávirkað talið 0,24 prosentstig uppeftir.

**Eftirlønarmál**
Arbeitt verður við eini framtíðar eftirlønarskipan fyri Føroyar. Endamálið er at skipa viðurskiftini soleiðis, at vit fáa eina fíggjarliga haldføra eftirlønarskipan, sum tryggjar øllum eftirlønarfólki ein virðiligan og góðan aldurdóm.

Avbjóðingin er hin sama hjá okkum sum hjá øðrum. Tað verða færri fólk í arbeiðsførum aldri og fleiri eldri. Samstundis økist vælferðin, og tað leggur størri trýst á vælferðartænasturnar frá tí almenna. Skal vælferðin ikki minka í framtíðini, ella skal skatturin ikki hækka munandi, má persónliga eftirlønaruppsparingin í Føroyum økjast nógv.

Endalig niðurstøða er ikki enn gjørd um, hvussu skipanin skal vera, men arbeitt verður út frá tilmælinum hjá Heimsbankanum, ið byggir á tríggjar súlur: Eina skattafíggjaða fólkapensión, sum skal tryggja tey gomlu móti fátækradømi, eina tvungna einstaklingauppsparing hjá tí privata og eina sjálvbodna einstaklingauppsparing.

## Fiskivinnu- og sjóvinnumál

**Fiskidagar og hjáveiða**
Fyri fiskiárið 2006/2007 verður skotið upp at lækka fiskidagatalið á landgrunninum 3% fyri bólkarnar 3, 4 og 5. Á Føroya banka eiga fiskidagarnir at vera munandi færri, tó ikki hjá bátum í bólki 5.

Mangan hevur verið ført fram, at vit hava ikki greitt hjáveiðuspurningin í uppsjóvarfiskiskapi, serliga eftir svartkjafti. 1. januar 2007 verða munandi broytingar á hesum øki, tí tá verður skiljirist í svartkjaftatroli eitt krav, samstundis sum kunngerð verður lýst, ið skipar økini, har loyvt verður at veiða svartkjaft. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan hjáveiðu og fyri at gera tað lættari hjá ymsu skipabólkunum at leggja veiðu sína til rættis.

**Lóg um vinnuligan fiskiskap**
Nevndin, ið varð sett seinasta ár at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, hevur lagt ein samandrátt av arbeiðinum fyri landsstýrismannin í fiskivinnumálum og fylgibólkin, ið er mannaður við eitt nú vinnuumboðum, og sum varð settur samstundis, sum nevndin fór til verka. Í august/september verður alt tilfarið lagt fyri landsstýrismannin. Arbeiðið hjá nevndini verður býtt í tveir partar. Annar er ein gjøgnumgongd av sjálvum lógartekstinum, hin er eitt beinleiðis uppskot til lógarbroytingar. Landsstýrismaðurin fer at viðgera tilfarið og evna til eitt endaligt lógaruppskot at leggja fyri Løgtingið. Tilfarið verður somuleiðis viðgjørt av fylgibólkinum. Ætlandi verður uppskotið lagt fyri tingið seinni í hesi setu.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kunnaði stutt fyri ólavsøku samgonguna um nevnda samandrátt og frá ætlan sín. Ætlanin fevnir um broytingar á mongum økjum, teirra millum:

- Staðfesting av ognarrætti, sum fevnir um uppsøgn av veiðiloyvum, brúksskyldu, tilfeingisgjald og møguleika hjá tí almenna at selja fiskirættindi.
- Fiskiorku og fiskirættindi, sum fevna um veiðiloyvi, smidligari umsiting av fiskorku, avhending millum veiðibólkar og greiðari reglur fyri bólk 5.
- Lógarverk, sum fevnir um at skipa alt lógarverkið í fýra høvuðslógir, báta- og skipamát, kanning av ognarrætti og ymsar grundleggjandi orðingar í lógini.

Harnæst umfatar ætlanin eisini lógaruppskot á nýggjum øki so sum:

- Annað havtilfeingi, sum fevnir um ílegu og ílegueginleikar.
- Kærunevnd og kærumøguleikar.

**Millumlandasamstarv og samráðingar um fiskivinnumál**
Almenni áhugin fyri fiskiskapi hevur ongantíð verið so stórur kring heimin sum nú, og fiskiskapur er vorðin afturvendandi evni á ST-aðalfundinum. Í juni varð farið at endurskoða ST-sáttmálan frá 1995 um at varðveita og umsita millumøkja fiskastovnar og ferðandi fiskastovnar, og í ár varð eisini farið undir nýggja tilgongd í ST at viðgera lívfrøðiligt fjølbroytni í altjóða sjógvi.

Tíverri er rákið alt oftari merkt av kenslubornum og illa grundaðum lýsingum av fiskiskapi sum stórari umhvørvishóttan. Dømi er átakið at banna botntroling í altjóða sjógvi, har als ikki verður hugsað um, hvussu umráðandi havsins tilfeingi er sum matvøra, og at tað er lívsgrundarlag hjá nógvum londum og samfeløgum kring heim. Samstundis gerast marknaðarkrøvini um burðardygga stovnsumsiting alt sjónligari, sum tíðin gongur. Tí ræður um hjá okkum at leggja størri dent á at kunna umheimin betur um føroyska fiskivinnu, og hesum fer Landsstýrið at arbeiða miðvísari við.

Fiskivinnusamstarvið í Matvøru- og landbúnaðarfelagsskapi ST, FAO, er góður samskiftispallur hjá heimsins fiskivinnulondum og gevur høvi at gera felags reglur um burðardyggan fiskiskap, aling, handil við fiskavørum o.a. Landsstýrið fer at arbeiða fyri føroyskum atlimaskapi í FAO, eins og vit hava í Sjóvinnufelagsskapi ST, IMO. Atlimaskapur fer at geva okkum virknari og sjónligari leiklut sum fiskivinnutjóð í heimshøpi.

Tá ið talan er um felags fiskastovnar í Norðuratlantshavi, leggur Landsstýrið framvegis stóran dent á at styrkja samstarvið um hesar stovnar, so at teir verða nýttir burðardygt.

Hóast framstig eru gjørd seinastu árini, so eru enn týdningarmiklir felags fiskastovnar, sum eingin nøktandi skipan er fyri, serliga norðhavssild og kongafiskur í Irmingarhavinum. Hetta skerjir eisini møguleikarnar hjá londunum í NEAFC at basa ólógligum fiskiskapi. Tó eru átøk hjá NEAFC farin at gera mun, sum t.d. at nokta skipum at koma í havn, um tey fiska ólógliga í NEAFC-øki.

Fiskiveiðuavtalur við onnur lond og fiskirættindi í altjóða sjógvi hava stóran týdning fyri føroysk skip. Summar avtalur geva rúm fyri fiskiskapi í fremmandum sjógvi alt árið, aðrar loyva skipum at fylgja ferðandi stovnum, so at tey kunnu gagnnýta veiðimøguleikar sínar sum best. Landsstýrið leggur dent á at varðveita og styrkja hesar avtalur og at menna aðrar møguleikar.

**Hvalaveiðumál**
Á ársfundinum hjá IWC í junimánaði samtykti lítil meiriluti av limalondunum, teirra millum Danmark, at IWC skal byggja avgerðir sínar á megin-regluna um burðardygga gagnnýtslu, og at hvalaveiðubannið frá 1982 eigur at verða avtikið.

Hetta er at fegnast um, tí í fleiri ár hevur almenna kjakið um vinnuliga hvalaveiðu bygt á tað grundarlag, at IWC bannar slíkari veiðu, og at ógjørligt er at tryggja burðardygga gagnnýtslu av stórhvali, hóast fleiri hvalastovnar eru væl fyri. Fer IWC aftur at virka sambært sáttmálanum, kann hetta styrkja hugsanina um, at hvalaveiða er vanlig gagnnýtsla av havsins tilfeingi, ið lond eiga at samstarva um. Hetta hevði havt stóran týdning fyri øll hvalaveiðulond, eisini Føroyar. Tó er framvegis langt á mál at finna teir neyðugu tríggjar fjórðingarnar av limalondunum í IWC, sum skulu til fyri at áseta kvotur fyri vinnuliga stórhvalaveiði.

Samstarvið í NAMMCO at umsita og granska havsúgdjór í Norðuratlantshavi hevur ment seg á fleiri økjum seinastu árini. Vísindanevndin hjá NAMMCO samskipar nú aftur stóra hvalateljing í 2007, og Føroyar vera við í hesum arbeiði sum vant. Tøkniliga samstarvið um, hvussu best er at drepa hval og kóp, er eisini týðandi táttur í arbeiðinum hjá NAMMCO, og eisini á hesum øki hava Føroyar havt virknan leiklut við síni serfrøði og áhaldandi royndum at bøta um skipanir og tøkni í grindadrápi.

**Fiskivinnugransking**
Støðug menning í fiskivinnuni er fyritreyt fyri at styrkja um kappingarføri hennara. Tí er ætlanin framhaldandi at tillaga játtanirnar til gransking á fiskivinnuøkinum, so at vinnumenningin gerst miðvísari.

Fiskivinnan er øll grundað á vitan, og henni tørvar støðuga gransking og menning. Vit eiga at leggja stóran dent á at fremja hesar tættir í neyvum samstarvi við vinnuna og við rótfesti í teimum spurningum, sum henni tørvar at greiða.

Útgangsstøðið er, at gransking er drívmegin í at troyta nýggjar møguleikar á sjógvi og á landi. Tí eiga vit at styrkja tann partin av vitanar- og førleikagrundarlagnum, sum byggir á gransking og menning, og arbeiðið eigur at fevna um allar umráðandi vinnutættir – frá grunni at munni.

Ásannandi tann týdning, sum fiskivinnan hevur í samfelagi okkara, er miðvís menning av hesi vinnu ein sjálvsøgd fyritreyt fyri framburði í samfelagi okkara. Landsstýrisins leiklutur er m.a. at raðfesta vitan og fakligan førleika við játtanum til gransking og menning, so at fiskivinnan altíð er í fremstu røð.

**Føroya altjóða skipaskráseting (FAS)**
Arbeiðsbólkurin, sum viðgjørdi eina dagføring av FAS, handaði landsstýrismanninum í fiskivinnumálum álit í januar mánaði, og arbeiðið at gera neyðugu tillagingarnar er byrjað. Tá ið arbeiðið er liðugt, verður av álvara farið at marknaðarføra

FAS til tess at menna henda inntøkumøguleika okkara.

Níggju skip komu aftur at skipaskrásetingini í 2005. Hetta er at frøast um, serliga tí at tvey teirra eru nýbygningar hjá útlendingum, sum hava valt at skráseta skip síni her. Síðan 2002 eru 19 skip komin aftur at FAS-skipanini og seks eru burturúrfarin, tó einki í 2005. Við árslok 2005 vóru til samans 35 skip í Føroya altjóða skipaskráseting.

**Skipaeftirlit**

Arbeiðið hjá Skipaeftirlitinum verður styrkt við eini støðugt øktari játtan til starvsfólk. Í 2006 var játtanin 500.000 kr. hægri enn árið fyri, og skotið verður upp at hækka játtanina til starvsfólk í 2007 eisini.

Til heystar verður kanning sett verk í sambandi við ætlaðu ISO-9000 skipanina, ið er ein innaneftirlitsskipan, sum skal tryggja, at allar skipaðar mannagongdir eru í samsvari við altjóða krøv. ISO-9000 umfatar eisini eina góðkenning av arbeiðinum og førleikanum hjá eftirlitsfólkunum. Uttanveltaður eftirlitsstovnur stendur fyri nevndu kanning.

Í hesum døgum verður arbeitt við eini mannagongd, ið skal tryggja, at altjóða krøv verða lýst og sett í verk sum fráboðanir frá Skipaeftirlitinum. Harafturat er Skipaeftirlitið regluliga við á útvaldum ráðstevnum hjá IMO, og stovnurin er eisini við í regionalum samstarvi í Norðurevropa. Endamálið við hesum virksemi er at menna Skipaeftirlið eftir altjóða leisti, samstundis sum vit støðugt hava dagførdan kunnleika um altjóða rákið á økinum.

**Aling**

Eftir stóru ILA-trupulleikarnar eru tekin um, at koppsetingin hevur bart niður hesa fiskasjúku, og at tað gongur framá við alingini. Tó er alsamt neyðugt at dagføra reglurnar um sjúkufyribyrging og niðurberjing. Neyðugt er eisini at dagføra eftirlitið, tí nýggjar sjúkur kunnu altíð fara at gera um seg, eins væl og gamlar kunnu koma afturíaftur.

Alilógin verður nú endurskoðað. Roynt verður at bera so í bandi, at aliloyvi skulu ikki liggja ónýtt, og at aliloyvi í framtíðini skulu fella teimum dugnaligastu alarunum í lut. Málið er eisini at dagføra karmarnar við atliti at vinnuligu og tøkniligu menningini á økinum. Ætlandi verður uppskot at broyta alilógina lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

**Arbeiðsmarknaður**

Nýorðaða visjónin um føroyska arbeiðsmarknaðin sigur, at hann skal vera ein rúmligur, vælvirkandi, mennandi og tryggur arbeiðsmarknaður, har tað er lætt at bjóða fram og fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi. Harumframt eru mál sett fyri, hvussu vit fremja hesa visjónina.

Leingi hevur verið tosað um, hvussu vit greiða trætumál og spurningar um sáttmálabrot sum skjótast og við fyriliti fyri samfelagsligum áhugamálum. Nú hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjørt sáttmála um hesi viðurskiftini, og stovnaður er fastur gerðarrættur. Hetta er eitt rættuligt framfrot, og partarnir eiga miklan heiður uppibornan fyri hetta avrik sítt.

Ætlanin er nú, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu gera uppskot um nýggja semingslóg, ið skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin, og sum skal hóska til nútíðar arbeiðsviðurskifti og siðvenju.

Nýggj lóg um arbeiðsskaðatrygging verður løgd fyri tingið í heyst og kemur í staðin fyri vanlukkutryggingarlógina. Við hesum verður lóggávan dagførd og verður javngóð við aðrar í Norðurlondum. Nýggja uppskotið veitir munandi betri sømdir enn higartil, m.a. viðvíkjandi teimum skaðum og sjúkum, sum nú verða viðurkend sum arbeiðsskaðar. Hon fer eisini at veita betri sømdir viðvíkjandi teimum upphæddum, ið veittar verða í endurgjaldi og samsýning.

**Familjupolitisk átøk**

Landsstýrið fer at fremja eina røð av familjupolitiskum átøkum. Parturin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum snýr seg m.a. um:

· at tryggja tímaløntum løntakarum á privata arbeiðsmarknaðinum lutvíst endurgjald fyri inntøkumiss í sambandi við arbeiðsfráveru orsakað av barnsins fyrsta og øðrum sjúkudegi. Tímalønt á privata arbeiðsmarknaðinum hava ikki henda sáttmálabundna rætt. Ætlanin er at seta hetta í verk við broytingum í sjúkradagpengalógini í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Harumframt eru familjupolitisk átøk í umbúna hjá øðrum landsstýrismonnum. At nevna eru t.d. umlegging av barnafrádráttinum í skattinum til útgjald, hækkaður barnastuðul til forsyrgjarar við láginntøkum, hækkaður studningur til lesandi forsyrgjarar og lógarfesting av felags foreldrarætti.

**Rúmligur arbeiðsmarknaður**

Ynski Landsstýrisins er, at fólk við skerdum førleika skulu gerast partur av vanliga arbeiðsmarknaðinum, har til ber. Til tess eru gjørdar almennar skipanir við endurbúgving og vardum størvum, og Almannastovan hevur við eini arbeiðsmarknaðardeild lagt dent á at styrkja hesar skipanir. Hóast hesar skipanir er tað ein sannroynd, at tað er torført hjá slíkum fólki at koma á arbeiðsmarknaðin. Tað er eisini sannroynd, at fólk sleppa mangan ikki upp í part longur, tá ið tey fáa brek ella sjúku seinni í lívinum. Fyri at bøta um hesi viðurskifti er neyðugt at seta munagóð tiltøk í verk. Ein styrkt arbeiðsmarknaðardeild á Almannastovuni skal tí vera karmur um eina serliga verkætlan, ið skal fáa fleiri fólk við skerdum førleika á arbeiðsmarknaðin, umframt at hon skal fyribyrgja, at fólk missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Ætlanin er, at tilskundanin til at arbeiða harumframt skal betrast við at lækka mótrokningina í pensjónini av aðrari inntøku úr 60% niður í 30%. Frá 1. januar 2007 skal inntøkuloftið hjá lægstu fyritíðarpensjónistum harumframt hækkast, og hjá hægstu fyritíðarpensjónistum skal tað lækkast.

Við støði í hesum politisku tiltøkum verður miðað eftir, at lægsta fyritíðarpensjón verður avtikin 1. januar 2009.


**SELUR TÚ**

**skipa- ella bátaútgerð?**

So er FF-blaðið ein hollur boðberi, sum fer umborð á skipini – umvegis reiðaríini – hvønn útgávudag.

Gerið tí eina skilagóða lýsingaravtalu við okkum



FF bláðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Telefon 31 15 69

ff-blad@post.olivant.fo






**Blákrossheimið**

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

*Vit kunnu m.a. bjóða...*

- *avrúsan og viðgerð*
- *einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)*
- *samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)*
- *eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi*

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

*Vit vilja fegin hjálpa tær*

Blákrossheimið FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

**MAN B&W Diesel A/S**

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

# Víst er kappingin hótt

Útvarpið tók um dagarnar upp okkara sjónarmið um ta hóttu kappingina um fiskin, sum vit vístu á í seinasta blað, nú skip og virki í størri og størri mun leggja saman aftur, eins og støðan var undan 1990.

Til hetta hevur Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood, ta viðmerking, at skipini hjá teimum fara ikki at fíggja eitt møguligt hall hjá virkjunum. Skipini fara so vítt gjørligt at fáa marknaðarprís fyri fiskin.

Hetta ger okkum nú ikki nakað serliga nógv tryggari.Tað er nú einaferð soleiðis, at broytir tú eina mekanismu, so fær tað avleiðingar so ella so. Fyrr var tað so, at Fiskavirking mátti kappast við aðrar fyri at fáa fiskin hjá Beta-skipunum. Hetta noyddi teir at gera sítt ítasta bæði við at fáa hægsta prís og at halda kostnaðin niðri. Hetta er ikki so umráðandi longur, nú teir "eiga" fiskin.

Um ikki skipini koma at gjalda beinleiðis hall av virkinum, kann tað væl henda, at hetta verður goldið við einum lægri prísi, so hýruútreiðslurnar gerast lægri.

Tað er hetta, sum vit ræðast!

Fiskirannsóknarstovan

Til verkætlanina "Kanning av koralløkjum" lýsir Fiskirannsóknarstovan hervið eftir skipi, sum er minst 50 brt til støddar.

Verkætlanin snýr seg um at kanna hvar og hvussu nógv er til av korallum kring Føroyar.

Talan er um at gera undirsjóvarupptøkur á Suðuroyarbankanum og á Munkagrunninum.

Ætlanin er at byrja seinast í august mánað og halda á í 2 vikur.

Meira fæst at vita við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna tel. 35 39 00.

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf. 44 41 74
Fax: 44 42 65

# Løgmansrøðan var sum allar aðrar

Vit endurgeva í blaðnum í dag partar av løgmansrøðuni á ólavsøku, sum vit meta hava størsta áhuga fyri fiskimenn og verkamenn annars.

Tað er annars nokkso stuttligt at síggja virðmerkingarnar hjá teimum ymisku flokkunum til løgmansrøðuna.Tær eru allar nokkso eins, leisturin er í hvussu er tann sami. Men uttan mun til, hvør ið situr í andstøðu, so verður ein løgmansrøða altíð lastað niður í sand og øsku, meðan samgongan altíð heldur hana ikki vera so galna.

Tá skal borgarin heldur ikki taka tað so tungt, hvat ið stendur í røðuni, ella hvat flokkarnir halda um hana.

Vit fara tó at nevna eitt punkt. Høgni Hoydal saknaði, at ikki eitt orð varð nevnt um rættartrygd í hesi røðuni. Her hevur hann púra rætt. Men tað skal tó sigast, at tær seks løgmansrøðurnar, Høgni var næstur løgmanni, varð í hvørji einastu løgmansrøðu tikið til rættartrygd. Men politikkurin var beint tann mótsetti. Tað hevur ongantíð staðið so illa til við rættartrygd hjá borgarunum sum júst tá.

Verandi løgmaður hevur heldur ongan áhuga fyri rættartrygd, sum hann heldur einki sigur um í síni røðu. Hetta er tann fremsta atfinning vit hava at honum. Vit hava nú í fleiri bløðum við einum einstakum dømi frá Toll og Skatt kunnað víst á, hvussu út av lagi vánalig rættartrygdin er í Føroyum.

Men eingin letst um vón, heldur ikki løgmaður. Hetta er í hvussu er ræðandi fyri okkum sum umboða vanliga borgaran.

# Føroya Banki skipar fyri fundi um eftirløn á Sjómannadegnum

Sum høvuðsstuðul hjá Føroya Sjómannadegi skipar Føroya Banki týskvøldið 15. august kl. 19.30 fyri eftirlønarfundi í Skálanum í Klaksvík. Fundurin er ætlaður fólki í fiskivinnuni, og til ber at boða frá luttøku áðrenn 11. august.

Í seinastuni hava eftirlønarviðurskifti føroyinga verið nógv umrødd, og ført hevur millum annað verið fram, at føroyingar eru eftirbátur á hesum øki.

Føroya Banki bjóðar fram eina røð av tænastum í sambandi við pensjónsuppsparing, og í sambandi við Føroya Sjómannadag verður ljós varpað av pensjóns- og eftirlønarviðurskiftini hjá starvsfólkum í fiskivinnuni bæði á sjógvi og landi.

Á fundinum 15. august kl. 19.30 í Skálanum fara fleiri serkøn fólk at greiða frá. Hans Peter Clementsen, deilarleiðari hjá Føroya Banka í Klaksvík, leggur fyri við at bjóða vælkomin.

Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, fer síðan at greiða frá pensjóns- og eftirlønarviðurskiftunum hjá føroyskum sjómonnum.

Joan Stampe og Tummas Pauli Mýri, íløguráðgevar í Føroya Banka, fara at greiða frá møguleikum at spara upp pensjónir og eftirlønir, og fundurin endar við, at Anna Maria Ragnarsson, pensjóns- og íløguráðgevi í Føroya Banka, takkar fyri.

Tey, sum ætla sær við á fundin, skulu boða fra luttøku áðrenn kl. 13.00 11. aug. við at ringja 456377 ella senda teldupost til anna.maria.ragnarsson-@foroyabanki.fo

# Met søla til Havsbrún

Orð og mynd: Torleif J.


"Fagraberg" á Fuglafirði við uml. 3100 tonsum av sild.

Mánadagin 7. august kom "Fagraberg" á Fuglafjørð við umleið 3100 tonsum av sild.

Teir høvdu samtrolað við "Høgaberg", sum eisini kom fulllastaður á Fuglafjørð samstundis. Teir høvdu fiskað í altjóðaøki ella í NEAFC øki millum Jan Majn og Norra.

Høgni Hansen er skipari á "Fagrabergi". Hann sigur, at tað eru fleiri fyrimunir við at samtrola eftir sildini. Trolið gongur betri og fangar harvið betri, og so brúka teir bara umleið helvtina av tí olju, sum teir annars høvdu brúkt, um teir trolaðu sjálvir.

Høgni sigur, at hann veit ikki, hvussu nógv tons eru í lastini, tí teir høvdu ikki landað, men teir hava roynt at fylt skipið so væl sum gjørligt. Tí meta teir seg hava millum 3100 og 3200 tons.

Hetta verður óivað størsta sølan hjá skipinum og størsta søla til Havsbrún. Um teir nú fáa lovaða prísin, 2.10 kr. so selja teir fyri umleið 6,5 mill. kr.

Tað hevur gingið væl hjá "Fagrabergi", síðani Framherji keypti skipið 17. juni í ár.

FF-blaðið www.fiskimannafelag.fo
Gerst haldari fyri einans 250 krónur um árið

## Jóhanna Mathea Skaale 100 ár:

**At taka úr blaðnum**

Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum

# Ættarsøga av Trøllanesi



*Jóhanna Mathea Skaale.*

**Tann 9. august fylti Jóhanna Mathea Skaale 100 ár. Tá ið hon fylti 95 ár, høvdu vit eina frásøgn um hennara lív. Tann frásøgnin skal ikki endurtakast her, men hon er til taks. Hon finst eisini á okkara heimasíðu: www.fiskimannafelag.fo, har farast kann inn í "Leita í teksti". Farið verður inn í ár 2001. Leitiorðið er Skaale.**

Hesuferð hava vit eina ættarsøgu av Trøllanesi, har Jóhanna Mathea eigur sín part. Meginparturin av frásøgnini er skrivað av Maluni Østerø, sum er dóttir Mikkjal, elsta beiggja Jóhonnu. Eisini er nakað tikið burtur úr samrøðu, sum Helena Samuelsen hevði við Jóhonnu Matheu í Dagblaðnum í 1995. Her skal verða nevnt, at hon norðuri á Trøllanesi hevur verið kallað Jóhanna, meðan hon í Havn verður kallað Johanna Mathea. Hesi bæði nøvini verða nýtt hvørt um annað í greinini.

Jóhanna Mathea Skaale fylti 100 ár 9. august. Hon er fødd á Trøllanesi, dóttur Marin Malenu og Jógvan Joensen í Innistovu. Marin Malena og systir hennara, Anna Sofia, vóru føddar í Havn í 1878 og 1879. Pápi teirra var Mikkjal Pauli Joensen, ættaður úr Innistovu á Trøllanesi. Mamman var úr Koltri og æt Jóhanna Niclasen. Hon doyði í barsilssong eftir at hava føtt ein son, sum eisini doyði. Í 1883 flutti Mikkjal norður aftur í barnaheimið. Har sat ein barnleys einkja, Petronella (f. 1843), sum hann giftist við. Mikkjal (f. 1847) var hálvbróður verfaðir hennara. Maður hennara var fallin í bjørgunum í 1878. Hann kallaðist Joen Joensen (f. 1851). Hann hevði fest 2. august, og umleið eina viku seinni datt hann oman.

Pápi Jóhonnu var úr Miðstovuni á Syðradali K. Hann var sonur Poul Joensen og Johanne Matheu Østerø Jacobsen av Eiði. Í fólkateljingini 1880 standa hann og systkini at eita Poulsen, men í 1890 er eftirnavnið broytt til Joensen.

Sum sagt flutti Mikkjal norður á Nes 1883. Tá búgva foreldur hansara í avtektslonini, kallað Nýggjastova, saman við soninum Jacob, seinri kallaður Jacob av Nesi. Men tá pápin doyði í 1886, og Jacob flutti til Viðareiðis, har hann seinri giftist, flutti mamman, Maren Malena Michelsdatter, inn til sonin. Umframt døturnar hevði Mikkjal eisini ein bróðurson norður við. Hetta var Jóhannes Edvard (f. 1872), ættaður av Selatrað, sonur beiggjan Elias. Petronella, kallað Nella, ið var ættað av Viðareiði, hevði tikið sær av einum dreingi hagani, Hans Nicolai, kallaður Klái. Mammu sína, Súsannu Jacobsen, hevði hon eisini tikið sær av, so umframt hjúnini, vóru 4 børn, frá 16 til 4 ár, og báðar ommurnar. Seinri tók hon sær av einum dreingi afturat av Viðareiði, sum æt Símun Torstein. Hann fór ungur. Hann róði út í Mikladali um vetrarnar. Eina ferð hann fór til útróðrar, gleið hann á stokkinum og fekk deyðamein og doyði nakað seinni. Hann gjørdist bert 28 ára gamal.



*Tríggjar vakrar gentur av Trøllanesi. F.v. Hjørdis, Jóna, og Jóhanna Mathea.*

**Altíð nógv fólk í húsi**

Hetta var húskið, tá pápi Jóhonnu giftist inn í 1903. Tann elsta sonin, Mikkjal, fingu tey í 1904 og Jóhonnu í 1906, so hon er von við nógv fólk í húsinum. Um ta tíðina giftist Johannes Edvard við Mariu Nicolaisen úr Havn. Hon hevði verið lærarinna í Kalsoynni frá 1893, og búði hon eisini í Innistovu, tá ið hon var á Trøllanesi. Børnini hjá teimum vóru Jóna, Conrad (Joensen) og Sigurd (Berghamar), sum alt teirra lív hava havt sterkt tilknýti til Trøllanes.

Nella átti eingin børn sjálv, men hon hevði stóra umsorgan fyri børnum, sum komu á hennara leið. Á Trøllanesi plaga tey at flenna at, at einaferð bar lærarinnan upp gátur fyri børnunum, ein var: "Hvat er hentast í bóndans garði." Tá svaraði Berint Wolles, beiggi Óla, úr Uppistovu: "Tað veit eg ikki, men í Innistovu er tað Nella."

Berint var føddur í 1903 og livdi langt upp í 90-ini. Hann plagdi ofta at siga frá, at Nella gav honum mangan breyðbitan út ígjøgnum gluggan, og eisini einar rotuskógvar við hvørt. Tey vóru 8 systkin í Uppistovu, so tað var ringt at skaffa skótoy hjá teimum, sum ikki vóru bøndur og ikki høvdu so nógv kríatúr.

Jóhanna plagar at siga, at Nella var so ófør at siga teimum frá søgum, og tað vóru søgur, sum hon tók úr egnum barmi. Tað dámdi teimum ógvuliga væl, men sum Jóhanna segði: "Mamma var so rættlinjað, henni dámdi ikki at man skuldi lúgva fyri børnum." Jóhanna man hava lært av henni, tí hon hevur dugað sera væl at siga frá.

**Øll máttu hjálpa til**

Í eini so lítlari bygd, máttu øll hjálpa til, um tað var til fjals ella fjørðu.

Jóhanna var sterk, og dugdi sera væl at nýta kreftirnar. Til at draga bát, gjørdi hon nyttu sum ein maður.

Eisini var hon djørv. Hon var mangan á fjalli og ofta í Skorunum – tað er vestanfyri Tindin (Nestind). Hon plagar at siga, at hon ofta droymdi um tað, tá ið hon bleiv eldri, so hon ikki fekk sovið. Tá var hon aftur í Skorunum og gekk um smalar rásir og brattar stíggjar.

**Hevur ikki spart seg sjálva**

Tá Jóhanna nú gjørdist 100 ár, so er tað ikki tí, at hon hevur spart seg sjálva. Hon var nummar tvey av sjey systkjum. Tey vóru fýra dreingir og tríggjar gentur, og var hon elsta gentan. Jóhannes, tann yngsti, var føddur síðst í juli 1917, so tá var Jóhanna knapt 11 ár.

Stutt eftir tað gjørdist mamman sjúk av tuberklum og var óarbeiðsfør. Sjúkan sat í lendum og mjadnum. Jóhanna plagar at siga frá, at læknin ráddi henni til at koma út so nógv sum gjørligt, tá ið veðrið var til tað. Tað var eisini nakað, sum Jóhanna tók á



*Hetta er mynd av foreldrum hennara. Marin Malena, av Nesi og Jógvan úr Miðstovuni á Syðradali, bæði vóru tey fødd Joensen.*



*Hetta er abbin, Mikkjal Pauli, saman við døtrunum Marin Malenu tv. og Onnu Sofíu.*

Framhald á næstu síðu

seg, í hvussu so var tá ið mannfólkini ikki vóru við hús. Hon styðjaði hana niður gjøgnum trappurnar, og setti ella legði hana út í sólina, og so næstan bar hana upp aftur gjøgnum trappurnar. Tey seinastu árini var hon nógv seingjarliggjandi og seinastu tíðina, hon livdi, hjálpti hon eisini til við at vakja yvir henni. Hon doyði á sumri 1922, tá var Jóhanna knapt 16 ár.

Ta síðstu tíðina mamman livdi, vóru tað 12 fólk, sum hoyrdu til húsið. Onkuntíð høvdu tey arbeiðsgentu eisini, men var tað serliga til útiarbeiði. Umframt foreldrini og systkini vóru: Abbin og omman, Mikkjal Pauli og Nella, og Anna Sofía, mostir Jóhonnu, sum helt húsið. Símun Thorstein doyði í 1914 av vanlukku, og Klái livdi til mitt í 20-unum, tá hann doyði av tuberklum, út við 50 ára gamal. Teir báðir vóru gubbar hjá Jóhonnu. Eisini vóru Christian Rosenmejer úr Uppistovu og Poul Johannes úr Útistovu gubbar. Gummurnar vóru mosturin og Nella. Hetta var sjáldsamt, bæði tí, at Nella var 63 ár, og at hon kallaði hana omma. So leingi sum Klái orkaði, passaði hann neytini, ambætaði og mjólkaði. Hann tók sær eisini av at sentrifuga ella skúma og at kirna smørið. Tað var ein stór hjálp hjá konufólkunum. Annars var hann har, ið ástóð, til hann mátti gevast vegna sjúku.

Tá ið Klái var borin út, fingu tey aftur ein sjúkling í húsið. Tað var ein kona, Anna Sophie úr Tunghúsinum, systurdóttur Mikkjal Paula, sum var komin til deyðis av tuberklum. Tey vóru barnleys, men høvdu tikið ein systurson hennara til fosturs. Hann kallaðist Jóhannes Fjallheim. Hon doyði og er jarðað har norðuri.



*Hendan myndin er tikin tá "mostur", Anna Sofía, fór til gravar 9. august 1965. Hetta eru systkini hjá Jóhonnu Matheu saman við makum. **Í aftaru røð f.v. eru:** Thorstein, Poul, Mikkjal, Marius Johannesen, giftur við Jónu, Jóhanna Mathea, Sigfred, Hjørdis og Alex, maður hennara. **Í fremru røð f.v.:** Karolina, gift við Thorstein, Julia, gift við Poul, Anna, gift við Mikkjali og Jóna.*

### "Mostur" gjørdist álitið í húsinum

Mosturin, Anna Sofía, kom í móður stað, tá mamman var deyð. Hon var lamin frá sumri 1906 eftir eina miseydnaða skurðviðgerð. Hon var tá 27 ára gomul, og hon gekk við høkjum ta fyrstu tíðina, og seinri við stavi restina av lívinum. Hon var komin upp at ganga á sjúkrahúsinum, tá ið Jóhanna var fødd. Hon helt seg ikki kunna unnverast á Trøllanesi. Barnakonur lógu so leingi í seingini tá, so hon fór norður at passa konu og barn. Hon lat at, at hon orkaði ógvuliga illa, men tað mátti gerast, og hon gjørdi tað.

Hon hevði ómetaliga nógv at gera, tí øll hesi fólkini skuldu hava klæðir, og tað mesta skuldi loysast úr lagdi, eisini vevast og seymast. Mamman og mosturin høvdu báðar verið í Havn og lært at seyma hjá einari, ið æt Anna Dam. Pápi teirra hevði keypt teimum seymimaskinu tíðliga, helst fyrru helvt av 90-unum. Tíðliga kom eisini bindimaskina í húsið. Hana keyptu pápin og mosturin, eftir at hann var komin í húsið. Báðar hesar maskinur eru til enn, og vit hava eisini myndir av teimum.

### Mannfólkini tøttu eisini

Mannfólkini vóru eisini við í tøtingini, tað var serliga við at nappa, kara, spinna, vinda saman og tvinna. Pápin plagdi at spinna grovt og kara. Hann spann ikki fínt, og fekk ikki nappað. Hann hevði verið sjómaður. Hann var skipari á "Atlantic" í 4 ár. Summarið í 1904 vóru teir undir Íslandi. Tá fekk hann bruna í tummulin á høgru hond. Tað bleiv so ringt, at teir máttu inn í Íslandi, har bleiv tað ytsta tikið av fingrinum. Tað hindraði honum í ávísum arbeiði. Tá ið heystið var fyri, plagdi hann at svæva og taka sundur, men tumma fekk hann ikki.

### Jógvan, pápin, hugsaði um næstan

Jógvan var ein sjáldsamur maður. Tá ið vitin skuldi setast upp á Kallinum síðst í tjúgunum, bleiv hann biðin um at ansa honum. Hann røktaði har, og hevði sína gongd har kortini. Hann svaraði, at tað kundi hann gott, men Jógvan bað teir fyrst spyrja Óla Wolles, tí hann hevði meir brúk fyri lønini. Hann hevði ikki so nógva jørð sum hinir í bygdini. Jógvan kláraði seg við tað, hann hevði.

Vitameistarin fortaldi hetta, tá ið hann kom aftur til Havnar. Hann segði, at sovorðnan næstrakærleika hevði hann aldri upplivað áður. Hann var rørdur til tár, tá ið hann greiddi frá hesum.

Jógvan helt tó, at hetta kundi gera, at Uppistovuhúsið ikki dankaðist av, og tað bar ikki til at liva á Trøllanesi við bara tveimum monnum. Óli var sjómaður, so Jógvan hevði eyguni eftir vitanum, tá ið hann var burtur.

### Jóhanna Mathea seymaði upp á drotningina

Jóhanna var heima, inntil systrarnar kundu taka yvir. Fyrsta plássið, hon hevði, var í Útistovu í Mikladali. Konan har var úr Útistovu á Trøllanesi.

Tá var eingin fartur, og tað tók um hálvan annan tíma at ganga í brattlendi millum bygdirnar. Seinni fór bátur at sigla, men Trøllanes var brimpláss, og tí kundi tað vera dagar og vikur at ikki var lendandi.

Í Mikladali var hon í umleið 2 ár, var tó heima við millumbilum, tá boð vóru eftir henni. Tá Jóhanna var 19 ár – á sumri 1925 – fór hon á Føroya Fólkaháskúla.

Síðani fór hon til Danmarkar í 1926. Hon vildi síggja eitt sindur av verðini. Fyrst hevði hon húspláss, seinri arbeiddi hon á seymistovum. Tann fyrra var í Gothersgøtu, og síðan fór hon at arbeiða á



*Her er familjan hjá Jóhonnu Matheu fulltald. **Aftara rað f.v.:** Annfinn, Jóannes og Marita. **Fremra rað:** Jógvan Asbjørn, Sigfred, Torgerð, Vigdis og Johanna Mathea. Tað kann verða nevnt, at øll seks børnini búgva í Havn.*



*Hendan myndin lýsir, hvussu sjúkraflutningur fór fram í gomlum døgum á Trøllanesi. Myndin er frá 30-unum. Marin Petersen úr Mikladali tænti norðuri á Trøllanesi og gjørdist knappliga sjúk, so doktarabáturin mátti koma eftir henni. Hann fekk ikki lagt at. Tískil kom pápi Marina, Poul Andreas, norður til Trøllanesar við báti. Hann varð drigin niðan frá á støðni. Børan við Marini varð løgd í bátin, sum síðan, hálvur standandi upp eftir enda, verður skotin út frá. Maðurin næst bátinum er Poul Andreas. Marin var annars á myndini frá Sanatoriinum, sum vit høvdu í seinasta blað.*

**Framhald á síðu 15**

# FØROYA SJÓMANNADAGUR KLAKSVÍK 16.-20. AUG.

FØROYA SJÓMANNADAGUR

Nú ber til at tekna seg til kappingarnar sum verða á Føroya Sjómannadegi 19. august
Tilmelding: tel. 456285 ella send ein mail til nordpres@post.olivant.fo







## Skrá:

**Mikudagin 16. august:**
**19.00** Sjómansøgur og sjómansvísur í Atlantis
Rithøvundurin Óli Olsen hugleiðir um hendingar frá Slupptíðini og Hans Eli Hansen, lærari fortelur um lagnutúrin hjá Sluppuni Dart
Eisini luttekur Hans Hjalti við sjómansvísum.

**Hósdagin 17. august:**
**17.00** -Útstilling við modelbátum og skipum í Strandferðslubygninginum.
**17.00** -Bátasavnið í Leirvík letur upp.
**17.00** -Fiskikapping á Kósabrúnni fyri bæði gentur og dreingir.
Aftaná kasta luttakarnar 100 fløskupostar út í Kalsoyarfirði.

**Fríggjadagin 18. august:**
**14.00** -Fiskivinnuráðstevna í Skálanum sum Reiðarafelagið skipar fyri.
**17.00** -Útstilling við modelbátum og skipum í Strandferðslubygninginum.
**17.00** -Bátasavnið í Leirvík letur upp.
**18.00** -Filmar av føroyskum skipum o.ø. verða sýndir í Atlantis.

**Leygardagin 19. august:**
**09.00** -Steinbjørn Jacobsen bjóðar vælkomin.
**09.10** -Bjørn Kalsø setur Føroya Sjómannadag.
**09.20** -Føroya Banki bjóðar til morgunmat.
**09.30** -Spurnakapping.
**10.00** -Standmynd verður avdúka á fiskastykkinum hjá Kjølbro.
**10.30** -Togtogan millum skipsmanningar.
**11.00** -Seglbátar fara av Leirvík og sigla rutuna hjá Ternuni/Dúgvuni.
**11.00** -Grindahvalur verður skorin upp.
**11.00** -Svimjukapping um vánna.
**11.30** -Hoppikapping á boyum.
**12.00** -Kapprógving.
**12.30** -Bjargingarroynd hjá Norðoya Bjargingarfelag.
**13.00** -Spurnakapping, finalan.
**13.30** -Føroyameistarakapping at skera agn.
**14.00** -Føroyameistarakapping í trolbøting.
**15.00** -Føroyameistarakapping í egning.
**18.30** -Føroyameistarakapping í sjómanstaki.
**19.00** -Føroyameistarakapping at kasta lodd.
**19.30** -Føroyameistarakapping at halda dregg.
**20.00** -Føroyameistarakapping í kelving.
**21.00** -Steypahandan til bestu skip og bátar í Føroyum.
**23.00** -Dans på brygga.

*Annað sum verður at síggja:*
*-Framsýning av livandi fiskum*
*-Málningaframsýning*
*-Sølubúðir*
*o.m. annað*

**Sunnudagin 20. august**
**11.00** -Sjómansgudstænasta í Christianskirkjuni.
**13.00** -Framløga við Óla Jacobsen og enska trolaraskiparanum Ken Knox í Atlantis.
**16.00** -Filmar av føroyskum skipum verða sýndir í Atlantis.
**17.00** -Bátasavnið í Leirvík letur upp.
**18.00** -Sjómansmøtið í teltinum á Bryggjuni. Rógvi Joensen skipar fyri.

# Øll tiltøk eru sjálvandi ókeypis!







Føroya Sjómannadagur — Klaksvíkar kommuna — FØROYA BANKI

### 82 ára gamli Aksel Hansen gevst ikki á hondum:

# Nýggjur "Beinir" komin

**Sunnudagin 30. juli kom nýggi "Beinir" á Havnina. Hetta er fyrrverandi grønlendski trolarin "Haanseraq", sum er keyptur av reiðarafyritøkuni hjá Aksel Hansen og kemur í staðin fyri "Mýling", sum fór úr flotanum fyri nakað av tíð síðani. Trolarin er 18 ára gamal. Vegna annað fiskiloyvi er "Beinir" nakað størri enn "Mýlingur". Hann er 42 m langur og 10 m breiður og maskinan er 1.800 hk. Keypsprísurin er um 15 mill. kr. Okkurt er at gera við skipið, so tað verður klárt um ein mánaða ella so.**



*Aksel bíðar spentur eftir tí 27. skipinum, hann tekur ímóti.*




*"Beinir" hevur lagt at.*

Tað mest merkisverda og hugtakandi við keypinum av hesum trolara er, at sjálvur reiðarin Aksel Hansen er nærri teimum 83 árunum enn teimum 82, og at hann bakkar ikki fyri at fara í holt við eina slíka avbjóðing.

Tí fer henda greinin eins nógv at vera nakrar hugleiðingar um hesa reiðarafyritøku og hennara virksemi.

Hon byrjaði við Poul Hansen, pápa Aksel, sum var ættaður úr Vestmanna. Hann kom sum ungur til Havnar at vera krambakallur hjá M.C. Restorff í Vágsbotni. Tá henda fyritøkan gavst, stovnaði hann í 1927 sína egnu heilsølu, sum enn er sera væl kend.

Í 1938 stovnaði hann p/f Kimbil, sum keypti trolaran "Stella Argus". Komandi ár eru 50 ár liðin, síðani størstu vanlukku á sjónum eftir kríggið, tá "Stellan" hvarv á sildaleiðunum norðanfyri Føroyar við fleiri enn 20 monnum.

Aftaná kríggið vant reiðaravirksemið hjá Poul Hansen rættuliga uppá seg. Teir keyptu tá "Kallsevni", sum var ein fyrrverandi enskur trolari.

Slóðbrótaravirksemið hjá Poul Hansen byrjaði í 50-unum, tá synirnir eisini vóru komnir upp í leikin. Her skulu vera nevnd nøkur av teirra avrikum.

**Bacalao**

Eitt virki á landi, sum er knýtt at teimum, er Bacalao. Tað er framvegis ein partur av býarmyndini í Havn.

Poul Hansen hevði fleiri skip, men umstøðurnar at turka fiskin vóru vánaligar, og siglast mátti til fleiri pláss við og eftir fiski, og hetta var ov kostnaðarmikið.

Poul Hansen tók tískil stig til at byggja Bacalao, sum skuldi vera eitt turkihús til klippfisk. Í 1953 var farið í holt við byggingina. Aðrir góðir menn vóru eisini við – so sum Esmar Fuglø og Hans Jakku í Smæruni.

Longu í 1956 var Bacalao nógv tann størsti privati arbeiðsgevarin í Havn. Teir rindaðu kr. 600.000 av samlaðu lønarútgjaldingununum uppá 2,4 mio. kr. Telja vit Poul Hansen sjálvan og Kimbil við, so kemur upphæddin upp á 705 tús. kr. ella 29% av øllum lønarútgjaldingunum. Hetta var meira enn dupult so nógv sum tann næsti arbeiðsgevarin í støðd.

Seinni datt virking av klippfiski burtur, og Bacalao var eitt av teimum fyrstu virkjunum, sum fór undir flakaskering. Í nógv ár vóru teir eitt av størstu flakavirkjunum í landinum, sum tóku ímóti einum fjórðingi av tí fiski, sum varð landaður í Føroyum. Tað skal eisini verða nevnt her, at Bacalao var eitt av teimum fyrstu virkjunum, sum byrjaði prískappingina um fiskin við ársskiftið 1989/90, sum gav okkum marknaðarbúskap á hesum økinum.

Seinni endaði Bacalao í Føroya Fiskavirking, men tað er ein onnur søga.

**"Funnu" Flemish Cap**

Ikki minni slóðbrótandi er teirra virksemi innan fiskiskap. Her skal fyrst nevnast fiskiskapurin á Flemish Cap. Í 1956 leigaði Poul Hansen "Atlantsfarið", sum við Júst í Túni sum skipara, fór á royndarveiðu á Flemish Cap. Hetta eydnaðist sera væl, og tey fylgjandi 40 árini var hetta ein av okkara týdningarmestu fiskileiðum.

Samstundis byrjaði línubátatíðin, har teir hjá Poul Hansen eisini gingu á odda. Saman við Højgaardsmonnunum á Toftum vóru teir fyrstir at byggja stállínuskip í Noregi, og "Brestir" og "Beinir" komu í 1957. Júst í Túni førdi "Brest" og Eiler Jacobsen førdi "Bein". Hetta ár lótu teir eisini "Búgvan" byggja á Tórshavnar Skipasmiðju. Í 1959 kom "Grímur Kamban", sum Poul Hansen sjálvur átti. Men teir høvdu so tríggjar av hesum nýggju línubátunum, og vóru hesi skip eitt frambrot, tá talan var um umstøðurnar hjá manningini. Vit hava annars í blaði nr. 284 greitt nærri frá línubátasøguni í okkara frásøgn um "Vesturhavið Blíða."

Tað vóru hesi nýggju línuskipini, sum fyri ein stóran part áttu heiðurin av, at Føroyar komu seg so væl eftir kreppuna í 50-unum, og at vit tá fingu skip til okkara egnu fiskimenn. Vit fingu heilar 50 línubátar, men tað vísti seg at vera í so nógv av tí góða. Men hetta skapti virksemi bæði á sjógvi og landi í mong ár.

Her skal eisini verða nevnt, at teir hjá Poul Hansen eisini vóru virknir innan endurnýgging av trolaraflotanum. Kimbil bygdi "Brand Sigmundarson", og Tórshavnar Trolarafelag, sum teir eisini áttu sín stóra part, "Magnus Heinason" umleið 1960. Hesir trolarar vóru í mong ár millum teir fremstu í landinum.



*Næstu ættarliðini eru eisini á kajuni. Frá v. Elisabeth við pápanum Poul hjá Aksel, Elsa Maria og Regin, børn hjá Aksel. Síðan eru tað Erland og Aksel Eli, sum eru synir Onnu hjá Aksel, sum doyði fyri nøkrum árum síðani.*

**Fyrstir við kraftblokki**

Tá ið vit koma fyrst út í 60-ini er tað, at kraftblokkurin kemur fram. Her eru tað aftur teir hjá Poul Hansen, sum leggja fyri og gera "Brest" út við kraftblokki. Hetta var ein heilt onnur vinna enn í dag. "Brestir" tók kanska 160 t av sild til ídnað. Men fyrstu árini varð sildin saltað upp í tunnur, og manningin taldi einar 25 mans. Seinni fingu hini skipini hjá reiðarínum eisini kraftblokk. Teir fóru seinni burtur úr hesi vinnu, men av teirra framskygni gongur sjón fyri

# "So siga tey, at eg eri púra klár!"

**Jóhanna Mathea Skaale er nú 100 ár. Kári á Rógvi, ið gjørdist verommusonur hennara í 2004, hugleiðir her um hina ungu í sinni, ið hevur livað heila øld.**



*Hendan myndin av Trøllanesi er tikin uml. kl. 3-4 á morgni – sólin er við at rísa.*

At práta við Jóhannu Matheu er at fáa innlit í góða gamla føroyska mentan. Fótbólt og festivalar tosar hon ikki nógv um, men um at syngja, kvøða, ganga á fjall, røkta seyð, seyma, baldýra, halda høgtíðir, ættarskil og annað mangt.

Eftir at hava livað í heila øld, vaksin upp á útoyggj, lærd í Kjøbinhavn, uppalt seks børn, bart seg gjøgnum mangar truplar støður, er Jóhanna Mathea nakað merkt av elli, men tó nógv minni enn mong onnur væl yngru fólk.

Við hvørt kann hon villast í minninum. Eftir heila øld á hesi fold, er villingarsamt, hvør av øllum riðilinum av skyldfólki og vinfólki er farin, og hvør livir eftir, og hvat árstal hetta ella hatta var. Serliga kann vera trupult, tá nøvnini koma upp í saman, so mangir eita Mikkjal, Jóannes ella Jógvan.

Tíbetur eiti eg Kári, og havi ongantíð enn upplivað, at hon ikki kendi meg. Men einaferð spurdi hon ommudóttrina, Jóhannu, um hon var gift? "Jú, omma, tú veitst, at eg eri gift við Kára!" Skjót var Jóhanna Mathea at venda hesum og svaraði: "Ajú, tað veit eg – og so siga tey, at eg eri púra klár!?"

Tað eyðkenda málið av Trøllanesi er frægd at hoyra. Frásøgukynstur hevur hon sum fáur og dugir sera ofta at síggja tað skemtiliga í dagligum hendingum. Ikki er frítt, at hon kann gera nakað nógv av viðhvørt – einaferð spurdi eg, hvussu nógv pápi hennara skar. "Tað minnist eg ikki, men eini tredivu krov hingu so," segði hon, og legði afturat: "bara til gestir!"

Sum hjá so mongum stendur tað gamla serliga klárt í minninum. Mangan hava vit havt frægd at spurt hana um ymiskt, ið stendur at lesa í bókunum "Tey bygdu land". Tekning er har av Innistovu á Trøllanesi, har hon vaks upp. Bara at spyrja hana um okkurt einstakt rúm ella úthús kann fara við drúgvari tíð. Sornhús ella tarvafjós hava hvør sína søgu. Við stórari frægd og góðsku sigur hon frá um systkin síni og onnur fólk á Trøllanesi, um Hjørdis systrina, ið dugdi so einastandandi væl við seyði, um hini bæði húsini Útistovu og Uppistovu.

Hennara hús, Innistova, var valahús. Bæði kongs og væl av ogn var í húsinum. Í móðirlegg var Jóhanna Mathea ættað úr húsinum, mamman Marin Malena var garðsgenta, bóndadóttir ið stóð til garðin. Abbin kallaðist Mikkjal Pauli og var merkismaður. Hann var føddur í 1847 (árið fyri at donsku trælirnir vórðu fríair í Vesturindia), og hevði verið í tænastu á skansanum í Havn. Mikkjal abbin hevði stóra ávirkan á uppaling hennara, lærdi hana sálmar og vísur, meðan hann stóð og spann. Ótaldar søgur veit Jóhanna Mathea at siga um abba sín.

Ein søgan var tá Sigfred, maður hennara, var og vitjaði fyrstu ferð Norði á Nesi. "Nú sigur Sigfred við meg, hvat er hatta, eg hoyri? Er hatta huldufólk? Ánei, far tú upp á loftstromina og lurta, far so uppá, tá sært tú, at hatta er abbi, ið syngur Kingo! Som den gyldne sooool – tá bleiv hann so grúiliga lágur – freeembryder." Mikkjal Pauli fór hvønn sunnudag í føroysk klæði og las lestur fyri fólkinum á Trøllanesi. Johanna Mathea hevði til setning at busta kotið hjá honum og leggja tað í kistuna aftur mánadag.

Uppvøksturin var mentaður bæði handaliga og andaliga, og fyri Johannu Matheu var stigið ikki so stórt at fara til Danmarkar at læra at seyma. Abbanum dámdi at frætta tíðindi úr Kongens København, ikki minst at abbadóttirin hevði seymað drotningini kjóla til forlovilsisgildið hjá Fríðriki IX. Enn í dag sýnir hon hvørt plagg, ið ommudóttirin virkar. Hóast ellið kann ørkymla, standa bæði uppvøksturin og fakið hjá henni rimmarføst.

Sjálv heldur Johanna Mathea ikki so nógv um tað at halda føðingardag. "Har norði" høvdu tey ikki stundir til spæl í arbeiðstíðini, men gjørdu heldur burturúr høgtíðum. Á jólum fóru tey "heim á oyggj" at halda jól á Syðradali og á Húsum.

Soleiðis práta vit um so mangt í farnari tíð, men altíð spyr Johanna Mathea, hvussu tað gongur hjá mær, bæði við skrivingini í Íslandi og við seyðinum í Vestmanna. Við hvørt vil hon sleppa biltúr í Havnardal, har versonurin hevur seyð, og mangan er til døgurða ella annað hjá børnum ella skyldfólki.

Einaferð var sjónvarpssending gjørd um deyðan. Hetta dapra evnið fóru tey at spyrja búfólk á ellisheiminum um, tá skuldi Johanna Mathea siga: "spyrja meg um deyðan, havi livað so leingi, hví spyrja tit meg ikki um lívið heldur?" Ung er hon í sinni og tosar mangan um "hesi gomlu" á ellisheiminum, roknar enn ikki rættiliga seg sjálva uppí tann skaran.

Vónandi fær Johanna Mathea góðan føðingardag og mangar góðar løtur eftir hetta við ríkum práti.



*Handalagið hevur verið gott hjá Jóhonnu Matheu. Hetta er ein lampa, sum er gjørd til Marionnu, bróðurdóttrina. Marianna hevur sjálv gjørt skermin, men tað er Jóhanna Mathea, sum hevur lært hana at gera hann.*



*Vit endurgeva nakrar myndir, sum Johanna Mathea hevur málað á lørift fyri jól 2004, tá 98 ára gomul.*



*Ein forlipt langomma. Johanna Mathea saman við ommudótrini Eydnu og langommusoninum Benjamin.*

FFbladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



Framhald av síðu 10

mótaseymistovuni hjá Jack Olsen á Strøgnum.

Her vóru nógvar uppgávur. Ein av teimum var at seyma klæðini hjá Alexandrinu drotning, sum hon var í til trúlovingarveitsluna hjá Frederik, táverandi krúnprinsi og Ingrid í 1935. Hetta var ein svartur silkikjóli við onkrum hvítum mynstri í og ein svartur crépe georgette frakki, sum Jóhanna Mathea átti sín part av.

Av seymistovuni á Strøgnum gekk leiðin til Humlebæk norðuri í Sælandi, har Jóhanna skuldi vera hjá eini einsamallari gamlari damu. Einasta dóttir hennara var gift í Onglandi, og tá hon kom heim við trimum børnum at ferðast hjá mammuni, kom ein arbeiðsgenta afturat. Tað var Sigrid, systir Marius Johannesen, sum var giftur við Jónu, systir Jóhonnu Matheu. Hon kom tá at vera køksgenta í húsinum.

Síðan fór hon aftur á seymistovu eina tíð. Hon arbeiddi á bóndagarði uttan fyri Birkerød eitt summar og fór so aftur í húspláss.

Føroyskar gentur fingu ofta pláss í valaheimum í Danmark, og hetta var eisini galdandi fyri Jóhonnu Matheu. Nú kom hon at tæna hjá eini einkju eftir ein landsrættarsakførara, ið átti vaksin heimabúgvandi børn.

Tá hon skuldi fara haðani, fekk Jóhanna Mathea meslingar. Læknin, sum kom til hennara, lovaði at skaffa henni pláss, tá hon gjørdist frísk aftur. Og hetta pláss gjørdist hjá einum silvursmiði.

Hetta var aftur eitt valaheim. Har gjørdu tey enn meira burtur úr sær enn í øðrum heimum, har Jóhanna Mathea hevði tænt. Og sjálvt tá talan var um morgunmat, var tað ikki bert sum at siga tað við borðreiðingini. Frúan fekk sín morgunmat upp á seingina, og maðurin át einsamallur morgunmat í stovuni. Hon skuldi seta honum tríggjar ella fýra tallerkar, alt eftir hvat hann vildi hava til morgunmatar. Niðasti tallerkurin var altíð ein silvurtallerkur. Hann plagdi at siga: "Smør mig noget med farver". Hetta var ikki tað, Jóhanna var von við av Trøllanesi, men hetta riggaði kortini.

### Vanlukkan í 1935, tá Jóhannes datt oman

Í 1935, 2. august, hendi ein ræðulig vanlukka á Trøllanesi. Yngsti beiggi Jóhonnu Matheu, tann 18 ára gamli Jóhannes, fór at fleyga. Var so ella so áhalsin og datt oman.

Hetta var ein øgiligur hvøkkur fyri eina so lítla bygd. Símun Jóhan Wolles var bert 2 ára gamal tá, og hann minnist enn tann ófrættadám, sum var í bygdini hendan dagin. Hetta kom at merkja bygdina í langa tíð. Absalon í Útistovu sat í einum sessi longri niðri, og hann sá Jóhannes detta niður skamt frá sær. Hann hevði marruna langa tíð eftir hetta. Kona hansara Asta var komin til at eiga. Hon merkti einki til lív eftir hendan dag, og fekk eina deyðfødda gentu nakrar dagar seinri. 14. august átti Elspa, kona Óla Wolles, ein dóttir, sum varð kallað Jóhanna eftir Jóhannes. "Mostur" var altíð til hjálp, tá ið sjúka ella føðing var. Ta ferðina var gentan komin, áðrenn ljósmóðurin náddi fram.

Jóhanna Mathea var stødd í Keypmannahavn í 1935. Hon var knapt 16 ára gomul í 1922, tá ið mamma hennara doyði, so hon hevði passað Jóhannes nógv sum barn, eisini áðrenn mamman doyði, tí hon var sjúklig. Johanna var tískil ógvuliga góð við hann. Hon uppkallaði eisini fyrsta sonin eftir beiggjanum.

### Hevði ánilsi

Hóast stødd í Danmark kendi hon á sær, at okkurt var hent.

Johanna Mathea hevur greitt dóttrini Torgerð frá: "Eg droymdi, at mamma mín kom til mín og bað meg geva sær tað besta eg átti, og eg svaraði: "Nei, tú fært einki." Men so tók eg afturí aftur: "Tú skalt fáa hasa vøkru dukkuna, sum eg havi fingið frá tveimum gubbum." Mamma svaraði: "Eitt skalt tú vita, tað sum tú gevur mær,ført tú ongantíð aftur," og eg síggi mammu enn fyri mær, tá ið hon fór avstað við dukkuni. Í dreymi fór eg út í tún at vita, um eg sá meira til mammu, og tá sá eg hana sita á einum skýggi so glað við dukkuni í føvninginum. So vaknaði eg, og tá stóð eg veruliga uttanfyri í garðinum.

Tíðliga morgunin eftir fekk eg fjarrit úr Føroyum um, at bróðurin var deyður, men áðrenn eg breyt fjarritið upp, visti eg, hvat hent var."

Tvær ferðir fyri ikki so mongum árum síðani upplivdi hon hetta, sum hon síðani skilti mundi boða frá ófrættum:

"Báðar ferðirnar var eg stødd einsamøll inni hjá dóttur míni og sat við køksborðið og las við bakinum móti úthurðini. Tá kom eitt konufólk inn í gangin og spurdi, um hon kundi læna telefonina. "Ger so væl, hon hongur á bróstinum," svaraði eg, men vendi mær ikki á. Tað gekk ein løta, men einki hendi, og eg snúði mær nú á at vita, hví hon ikki ringdi; men tá var eingin har.

Stutt eftir hendi tað sama aftur, men hesa ferðina kendi eg tað, sum um onkur fór fram við mær. Men tá eg hugdi upp, var eingin har. Í báðum førum doyði vinkonur hjá mær stutt eftir, so eg haldi, tær eru komnar at biðja farvæl".

Jóhanna kom heim aftur í 1936/37.

### Jógvan fekk nógv bakkøst

Jógvan fekk nógv sløgini. Nøkur ár eftir at hava mist konuna í 1922, kom aftur sjúka í familju hansara. Miðlingasynirnir blivu báðir sjúkir. Tann eldri, Pól, fekk tuberklar og tann yngri, Torstein, fekk barnalammilsi. Hetta bleiv ov nógv fyri pápan. Hann endaði eisini á sjúkrahúsinum fyri trongd, og var hann eftir hetta hjartasjúkur. Allir lógu eitt skifti inni á sjúkrahúsinum í senn. Dreingirnir komu tó fyri seg aftur eftir nøkrum árum. Pól fór til Noregs at læra at passa revar. Hann fór saman við einum vinmanni, Jacob Samuelsen úr Leirvík, og komu teir aftur við revum, og bygdu revagarðar seinast í 30-unum. Tað gekk væl, og teir fingu eisini gott íkast av at selja alidjór. Seinri bygdi Pól hús á Nesi. Hetta vóru fjórðu húsini í bygdini. Hann giftist í 1943 við Juliu Hansen av Húsum. Við revunum gekk ikki so væl. Kríggið kom tá, og sambandið við útheimin – og harvið marknaðin – bleiv avbrotin. Pól misti ikki mótið fyri tað. Hann bleiv sjómaður, keypti seinri útróðrarbát saman við øðrum. Nøkur ár búðu tey í Klaksvík, har hann róði út, men tá hann gavst fyri aldur, fluttu tey norður aftur á Nes, har tey fingu fleiri góð ár afturat. Pól doyði 2003, knapt 95 ára gamal.

Tann yngri, Torstein, royndi sjólívið, men tað bar ikki til, tí hann var so lamin. Í fleiri ár arbeiddi hann á Sleipistøðini hjá Kjølbro, men tað var so nógv gongd upp og niður gjøgnum stigar, og sum hann eldist, bleiv tað ov strævið. Hann fór so á skúlan við Áir, har fekk hann handilsskúlaprógv til jóla í 64. Hann var gift-



*Hendan myndin er tikin eftir at mamma Johonnu Matheu var deyð í 1922. Í **aftara rað** síggja vit f.v. Hjørdis, Johanna Mathea, Jóna og Thorstein. **Frammanfyri:** Jóhannes, Mikkjal, Jógvan, pápin, og Poul.*

*Johanna Mathea sigur um systrina Hjørdis, at hon var so framúr at hava skil á seyði, sum var sjáldsamt fyri eitt konufólk. Hon kendi hvønn seyð, og hon kundi rætta uppá pápin á hesum økinum. Hon dugdi at handfara seyð sum fáur annar.*





*Mikkjal, beiggi Johonnu Matheu, í bjørgunum saman við konuni Onnu.*



*Anna Sofía, mostur ella ommudidd, var ein serlig persónligheit. Hon skipaði fyri í Innistovu við einum slíkum autoriteti, at eingin so mikið sum mukkaði. Hon var vird av øllum og kanska fara vit at kunna lýsa hana nærri í eini seinni grein.*

*Í 1949 var ein franskur málari á vitjan í Innistovu í 14 dagar, tá teknaði hann hesa myndina. Franskmaðurin at Jean C. Fozet.*



*Beiggin, Jóhannes, sum datt oman 18 ára gamal. Jóhanna Mathea hevði ánilsi um, hvat var hent, áðrenn hon fekk boðini.*

Framhald á næstu síðu

ur við Karolinu Michalsen úr Kunoy, og høvdu tey fingið sítt heim á Kósini í Klaksvík. Meðan Torstein gekk á handilsskúlan, bleiv nýtt flakavirki bygt á Kósini, hjá J. F. Kjølbro. Hann helt, at tað var so høgligt og søkti tí arbeiði har á skrivstovuni. Nakrar dagar seinri kom Páll á Dul at tosa við hann. Hann var ein av leiðarunum hjá J. F. Kjølbro tá og spurdi, hvat hann segði til at koma heim á Varpið í Timburhandilin at arbeiða. Har var hann so væl inni í tilfari og amboðum. Hann takkaði fyri, men so mátti hann fáa sær bil og koyrikort. Tað var bara gott, tí hann hevði ikki verið førur fyri at gingið niðan av Kósini leingi, og longur hann hevði bíðað, tyngri hevði verið at byrja at koyra. Tveir mánaðir eftir at hann byrjaði í timburhandlinum, fylti hann 50 ár.



*Johanna Mathea saman við beiggjanum Pól. Myndin er tikin 2. des. 1999.*

**Mikkjal var harður**

Tann elsti, Mikkjal, sum annars var raskur, hevði stórt pluss, sum tey kallaðu tað, tá ið hann varð pirkaður fyri tuberklar. Sjálvur plagdi hann at siga, at ein vetur hevði hann eitt ringt krím, sum tað gekk so illa at sleppa av við. Tann veturin misti hann so nógv hár. Koddin var svartur av hári um morgnarnar. Hann helt sjálvur, at hann hevði havt smittuna tann veturin.

Mikkjal var tó til skips í fleiri ár við pápabeiggjanum, Jóhannis í Miðstovuni á Syðradali, sum førdi "Saltaire". Mikkjal passaði motorin. Summarið í 1934 fekk hann ein snudd umborð. Hann datt á ein pullert. Harður, sum hann var av sær, varð ikki umtalað at fara inn, men gjørdu teir túrin lidnan. Hann riggaði sær eitt setur til, við tveimum fjalum, so hann kundi sita við snørið. Tá var vanligt at flekja á dekkinum. Tað bar slett ikki til hjá honum, tí hann fekk ikki bukkað seg fram yvir. Heimaftur komin skuldi hann fara í Hvannrók, men tað bar ikki til at sita í línuni. So var einki at gera uttan at fara til lækna, men tað gekk long tíð, áðrenn læknarnir funnu útav, hvat ið bagdi. Mikkjal skuldi giftast, og brúðurin, Anna Jacobsen av Húsum, var komin norður. Tey blivu so gift í november. Hann var tó so lamin, at tá brúðarmyndin skuldi takast, mundi hann svímað, tí hann kláraði ikki at standa. Um veturin ferðaðist hann aftur og fram millum heimið og læknan. Nakrar mánaðir seinri bleiv tað uppdagað, at hann hevði brotið mjødnina. Tá var alt lærið harðnað, tí okkurt hevði ligið ímillum. Hann fekk so skurðviðgerð og kom hampuliga skjótt aftur fyri seg. Tó kundi hann ikki fara í bjørgini tað árið. Hann var so eggjamaður saman við Marius Johannesen, seinni kendur sum m.a. háskúlastjóri. Hann var giftur við Jónu, systir hansara.

Marius var ikki bjargamaður, men teir kláraðu tað í felag. Annar hevði royndirnar og hin kreftirnar. Tann yngsti beiggin, Jóhannis, var bæði raskur og djarvur. Hann var tá blivin 18 ár, so hann var altíð klárur, tá farast skuldi í bjørgini. Tað var heldur ikki fyrsta árið, at hann royndi tað, men tann 2. august var hann, sum fyrr greitt frá, áhaldsin og fall fyri bakka. Hann bleiv ikki funnin aftur.

**Eingin almannahjálp, men kortini næstringahjálp**

Í 30-unum var einki sum æt sosialhjálp. Mikkjal segði, at tá hann skuldi giftast, hevði Pól ikki havt nakra inntøku í fleiri ár, og Torstein, ið tá gekk væl á 20-inda ári, hevði einki oyra forvunnið. So tá ið hann skuldi keypa sær brúðarklædning, keypti hann eisini teimum hvør sín klædning, annars sluppu teir ikki í brúdleyp. Hann hevði forvunnið væl.

Hann plagdi eisini at rógva út um vetrarnar við Óla á Dalinum, sum var giftur við fastur hansara, Bettu.

**Hjørdis met í at royta lunda**

Tann yngsta systirin, Hjørdis, bleiv gift við Alexander Jacobsen av Húsum, beiggja Onnu hjá Mikkjali. Hjørdis var sera skjótfør, og hevur hon met í at royta fugl á Nesi eina ferð, tey kappaðust. Hon sat við nr. 30, tá tímin var úti. Men tað var ikki bert tann eina dagin, at lundi varð roytur. Hetta kundi vera 8 vikur út í eitt. Konufólkini fingu rættuliga roynt seg.

**Øll vóru góð við Jógvan**

Pápi Jóhonnu var sera barngóður, og øll børn vóru góð við hann. Børnini á Trøllanesi fingu at vita – so tíðliga sum møguligt, at á bakkan, sum er sera høgur, máttu tey ikki fara, uttan vaksin fólk vóru við.

Tá ið Jógvan doyði í 1946, vóru 22 børn, úr 17 og niður í 0 ár, á Trøllanesi.

Hvønn dag, tá postbáturin kom, ella okkurt annað var undir bakkanum, fór Jógvan stetlandi oman á bakkan við stavi, so leingi hann orkaði. So fóru øll børnini, sum kundu ganga, rennandi aftaná, tó undantikið tey, ið kundu gera nyttu.

Ein hjallur stóð oman og niðan har tá. Norðanfyri har plagdi Jógvan at standa og hava eyguni eftir børnunum. Vóru tey niðan- ella norðanfyri, skuldu tey standa ella sita púra still. Vóru tey sunnan fyri, kundu tey gott spæla eitt sindur, har var ikki so vandamikið. Har stóð bátaspælið, og hetta dámdu børnunum væl at spæla við.

Tá ið Jógvan so fór til hús aftur, segði hann: "Nú fara vit niðan." So runnu øll niðan, tað var eingin, ið ikki aktaði. Um tey ikki høvdu gjørt tað, hevði hann ikki kunnað gjørt nakað. Hann kundi stýra øllum við blídni og einum smíli, so foreldrini kundu vera púra trygg.

**Johanna Mathea hevði "hotell"**

Johanna Mathea hitti Sigfred hjá Tom í brúðleypinum hjá Dánjal á Dul og Elspu Wolles úr Uppistovu í Trøllanesi í 1932. Tá seymaði Jóhanna í Havn. Tey blivu so trúlovað. Men, sum greitt frá – slapp hann at bíða eftir brúðrini. Hon skuldi fyrst gera sínar royndir í Danmark. Vit kenna fleiri onnur dømi um, at forlovaðar gentur vóru fleiri ár í Danmark, meðan dreingirnir bíðaðu í tolni, til tær komu heim aftur.

Tey giftust á vári 1937 og fingu 6 børn. Aftan á tað var hon ikki úti til arbeiðis aftur, men var heimaarbeiðandi, passaði heimið og børnini. Hon seymaði alt, tey brúktu í nógv ár. Teirra heim bleiv í Tvørgøtu 4. Tað var eitt heim, ið hevði nógv vitjandi. Skuldi fólk norðan eftir ørindir til Havnar, máttu tey liggja nátt. Tað var serliga um várarnar, tá ið sjómenn skuldu suður á bróstsjúkrahúsið at kannast, at tað bleiv ein ordilig innrás. Tað mugu vera fáir kalsingar í teirra aldursbólki, sum ikki hava verið inn á gólvið í Tvørgøtu 4, og nógv hava eisini yvirnáttað har. Eisini hýstu tey nógvum úr Klaksvík, har Jóhanna hevði nógv systkinabørn. Av familjuni hjá Sigfred komu eisini nógv, úr Kvívík, av Strondum og aðrastaðni. Í dag hevði tað ivaleyst verið kallað opið hús.

Tá ið Sigfred seinri bleiv borgmeistari í Havn, bleiv hon "Byens førstedame", so hon hevur roynt eitt sindur av hvørjum. Hon var hábærslig, tá ið hon í stakki tók ímóti kongaparinum.

Á Nesi kundi man hoyra fólk siga um eina uppskrýdda kvinnu: "Hvussu mundi handan sæð út sum neytakona." Jóhanna hevur roynt bæði, og staðið royndina við UG.

Tá ið børnini blivu eldri og vaksin, kundi hon kasta seg yvir egin áhugamál. Henni dámdi sera væl at mála á postalín, og eru tað verulig listaverk, hon hevur gjørt. Fyri 8 árum síðani fór hon á Ellisheimið at búgva, eftir at hava búð hjá dóttrini, Maritu, í nøkur ár. Á Ellisheiminum hevur hon stytt sær stundir við at mála á lørift.

Jóhannu hevur altíð dámað væl at lisið, og ger tað enn, men tað hevur hon ikki eftir fremmandum. Mosturin plagdi at siga frá, at tá ið tær systrarnar vóru ungar og plagdu at binda bul saman, so løgdu tær bókina á hornið á borðinum, so sótu tær hvør sínum megin, so báðar kundu lesa samtíðis, meðan tær bundu.

**Enn sera birg**

Tað hevur verið ótrúliga stuttligt at kent Jóhonnu Matheu. Hon hevur altíð verið so lívsglað og positiv. Ættarkenslu hevur hon sum fáur. Fermenningar eru nærmasta ætt. Enn lesur hon uttan trupulleikar og fylgir væl við í tí, ið hendir í samfelagnum. Hon hoyrir eisini væl. Og sum hon kann fortelja frá sínum langa lívi. Skemtingarsom er hon eisini, og hevur eisini sjálvspei. Tað hendir, at hon blandar okkurt, tá hon greiðir frá. Einaferð hon varnaðist hetta, sigur hon: "Og so siga tey, at eg eri púra klar!"

Jóhonnu Matheu verður ynskt hjartaliga tillukku við hesum stóra degnum.



*Hesa 100 ára gomlu seymimaskinu í Innistovu hevur Jóhanna Mathea vissulig brúkt nógv.*



*Tað sama er við bindimaskinuni, sum Jógvan í Innistovu her roynir.*

### Ortodoksi jødin David verið aftur í Føroyum:

# Gjørt kanningar av føroyskum fiskimonnum

Í fjør høvdu vit eina frásøgn um fýra ungar ortodoksar jødar, sum vit hittu í Svínoy, har teir ferðaðust.

Teir komu úr London og búgva í tí sokallaða Golders Green býarpartinum, har nógvir ortodoksir jødar búgva. Í hesum býarpartinum er alt tað, sum hoyrir til eitt jødiskt umhvørvi so sum synagogur v.m.

Hesir ungu menninir vóru á eini rundferð, sum eisini førdi teir til Føroyar. Ein teirra var tann nú 22 ára gamli David, sum lesur til lækna.



David á skrivstovuni.



David og Pál Weihe.

Abbi David kom upprunaliga úr Irak, meðan flestu jødar annars koma úr Europa og Amerika. Hesir báðir bólkar mynda hvør sína meinigheit, har munurin – sambært David – er sum millum katolikkar og protestantar, men teir eru kortini bestu vinir.

**Omman bjargað undan nasistunum**

Omma David er týskur jødi. Hon slapp úr Týsklandi í 1938. Hennara søga er eisini eitt dømi um, hvussu jødar – undir týskum ræði – sluppu undan tí vissa deyðanum, tí tað vóru persónar, sum løgdu lív og sál í at bjarga teimum. Í hesum førinum var tað ein enskur ortodoksur rabbi, Solomon Schonfeld, sum skipaði fyri at fáa flutt jødisk børn úr týskum øki til Bretlands. Harvið bjargaði hann túsundtals mannalívum, og omma David var ein teirra. En bók er skrivað um henda rabbinara undir heitinum: "Holocaust Hero", og sigur heitið á bókini nakað um tað ummæli, hann fær í eftirtíðini.

Schonfeld var eisini ein teirra, sum heitti á teir sameindu um at bumba jarnbreytaleiðirnar til týningarlegurnar fyri at forða framhaldandi flutningi av fólki hagar. Men av onkrari – í dag – óskiljandi orsøk varð hetta ikki gjørt. David er í somu synagogu sum onkur av børnunum hjá Schonfeld, sum hann kann takka fyri, at hann yvirhøvur er til.

Tað eru umleið 300.000 jødar í Bretlandi. Av teimum eru uml. 15% ortodoksir. At teir eru ortodoksir sæst fyrst og fremst við, at teir bera kalot á høvdinum og eru í serjødiskum klæðum. Meðan vit onnur taka hattin av høvdinum, tá vit skulu vísa virðing fyri Gudi ella øðrum, so gera ortodoksir jødar tað mótsetta. Teir hava á høvdinum, tá teir skulu vísa virðing, og hetta er orsøkin til, at teir hava kalottin. At teir vóru ortodoksir merktist serliga leygardag, sum er jødiskur sabbatur.

**Kunnu ikki so mikið sum tendra ljós sabbatin**

Sabbatin skulu ortodoksir jødar einki "ónyttugt" gera. Tíðin skal bert brúkast til at biðja, lesa í heilagu skriftunum og syngja og annars at taka sær av løttum.

Fyrsta ábendingin um, at hetta eru reglur, sum veruliga verða hildnar sást, tá David í fjør var biðin um at geva okkum sína teldupostadressu. Nei, hann kundi ikki skriva nakað sum helst, tí tað var sabbatur. Men hann kundi siga hana munnliga, so trupulleikin kundi loysast tann vegin.

Tá sabbatur er, er ikki loyvt at ferðast við t.d. bussi, bili ella á annan hátt, og maturin, sum verður etin, skal vera tilgjørdur dagin fyri. Helt meg kunna fanga teir við at vísa á, at teir høvdu so ljósið tendrað inni har teir gistu. Nei, tað var tendrað dagin fyri, og teir kundu ikki sløkkja ljósið fyrr enn eftir midnátt!

Tað skal tó sigast, at neyðsynjarørindi kunnu gerast. David sigur sum dømi, at sæst ein ortodoksur jødi koyra bil sabbattin, situr helst ein barnakona aftanfyri, og tey eru á veg til eina føðiklinikk. Tað sama er eisini galdandi, tá tað ræður um at verja landið í eini krígsstøðu.

Eitt annað, sum vísti, at hesir vóru øðrvísi, var maturin, sum skal tilgerast eftir jødiskum ávísingum. Hetta merkir m.a., at alt kjøt skal vera halalslaktað, tað vil siga, at djórið skal bløða til deyðis.

Vegna hesar og aðrar reglur mátti David hava ein stóran part av matinum, sum hann át í Føroyum, við sær úr London.

Tað eru eisini aðrar strangar reglur fyri lívinum hjá hesum fólkum. Eitt er, at tað er ikki loyvt at hava kynsligt samband áðrenn hjúnalagið. Verður hetta kortini gjørt, so kann ein ikki kallast ortodoksur, so einfalt er tað.

Men í øðrum førum eru teir ikki so avgjørdir. Teir skuldu ikki njóta nakað sum skaðar likamið. Tí er royking og rúsevni bannað. Men tá talan er um rúsdrekka, kann tað njótast við máta. Tá er tað ikki skaðiligt, og tað er heldur ikki bannað. Teir ásannaðu tó, at tað kundi vera ringt at sera mark. Ikki minst á Ólavsøku, sum David var á í fjør!

**Hóast tað tollyntir**

Men hóast hetta, so var David meira tollyntur enn vanliga verður roknað við av ortodoksum jødum.

Hann kundi góðkenna, at Ísrael gav land frá sær fyri frið, um hetta veruliga kundi tryggja frið. Men hann trúði nú ikki, at júst hetta við at fara úr Gaza, sum hendi í fjør, fer at loysa nakran trupulleika. Allar royndir vísa, at tað nyttar einki at geva víttgangandi kreftum lítlafingur. Teir gevast ikki, fyrr enn teir hava fingið alla hondina. Og tá ið teir hoyrdu ungar arabarar tosa, skiltu teir, at tað var framvegis arábiskt aðalmál at reka Ísrael í havið. So tað er kanska ikki so løgið, um teir eru varnir. Júst í hesum døgum er váttað, at friður gjørdist eingin.

Viðvíkjandi kristnum trúboðaravirksemi millum jødar eru ortodoksir jødar ikki tollyntir. Teir halda, at jødar skuldu hava frið at hava sína trúgv, eins og teir geva kristnum frið at hava sína trúgv. Sjálvir reka teir ikki trúboðaravirksemi millum kristin. Um ein kristin ynskir at fara yvir til jødadómin, verður meira mælt frá, tí tað er strævið at skula liva eftir ortodoksum jødiskum forskriftum. Hinvegin verður nógv gjørt fyri at fáa verðsligar jødar umvendar til at gerast ortodoksar.

Annars er David væl skúlaður í jødiskari trúgv. Hann hevur verið 2 ár á Talmudskúla, jødiskum bíbliuskúla, í Ísrael, har hann eisini hevur lært hebraiskt.

Her skal skoytast uppí, at jødar vanliga verða býttir upp í fýra bólkar: Tað er teir ultraortodoksu, sum als ikki viðurkenna Ísrael. Teir viðurkenna ongan stat, fyrr enn hann verður settur á stovn av sjálvum Messias. Síðan eru tað teir ortodoksu, sum eru sum David. Ein bólkur eru nationalistar, zionistar, sum ganga høgt upp í tey gudsgivnu rættindi til "landið", ið Gud gav teimum. Fjórði bólkurin eru teir verðsligu jødarnir, sum kunnu sammetast við verðslig kristin.

**Vildi sleppa aftur til Føroyar**

David gjørdist so hugtikin av Føroyum í fjør, at hann vildi sleppa aftur higar. Føroyar er nevniliga eitt paradís fyri jødar, tí her møta teir ikki tí jødahaturi, sum nógv er av aðrastaðni í heiminum. Her møta teir eisini einum kærleika til jødar, sum ikki finst í nógvum øðrum londum.




*Tað vóru fleiri ókendar hetjur, sum gjørdu sítt at bjarga jødum undan tí vissa deyðanum. Ein av teimum var Solomon Schonfeld, sum saman við túsundum øðrum fekk ommu David úr Týsklandi, áðrenn tað var ov seint. Hetta er bókin, sum er skrivað um hann.*

David hevði hug at koma aftur at fáa eitt summararbeiði, so hann kundi vera her í longri tíð. Hann spurdi okkum, um vit kundu hjálpa honum.

Tískil fekk hann arbeiði innan eina verkætlan, sum Pál Weihe stendur fyri. Hon snýr seg um at kanna umstøðurnar hjá fiskimonnum á langfaratrolarum. Her er nógv tilfar savnað inn, men tað er ikki arbeitt víðari við tí. Sum læknalesandi hevur David góðan førleika at arbeiða við hesum tilfarinum. Hetta hevur hann eisini gjørt. Nú, hann er liðugur at arbeiða, liggur ein drúgv frágreiðing eftir hann. Hesa fara vit so at frætta meira um í komandi bløðum. Pál heldur, at David hevur gjørt eitt dygdararbeiði.

**Ortodokst brúðleyp**

David var her í tveimum umførum. Fyrst kom hann í byrjanini av juni. Hann var 3 vikur, tá fór hann heim til London í brúðleyp hjá vinum, og fyrst í juli kom hann aftur í 3 vikur.

Í hesum sambandi greiddi hann okkum frá mannagongdini, tá ungir ortodoksir jødar finna saman. Høvuðsreglan er tann, at foreldrini finna fram til eina hóskandi gentu, og skipað verður fyri at tey hittast. Um bæði eru áhugað, so hittast tey aftur, og so kunnu tey verða trúlovað eftir 2 mánaðum. Eftir enn nøkrum mánaðum verða tey so gift, og vanliga er tað fyri lívstíð.

Um drongurin hinvegin ikki hevur hug at hitta gentuna aftur, so gerst ikki við. Tá mugu foreldrini royna at finna eina aðra gentu. Einaferð man tað fara at eydnast.

Tað kann eisini henda, at tey bæði finna saman av sær sjálvum, men her er treytin tann, at bæði skulu vera ortodoks. Tí vildi tað verið óhugsandi, at David kom heim úr Føroyum við eini gentu! T.v.s um hon ikki var ortodoksur jødi.

Nú er David aftur í London. Hann kemur uttan iva framyvir at hava eina serliga kenslu fyri Føroyar, her hann er komin at kenna fleiri fólk sera væl. Hetta kann uttan iva gerast eitt samband, sum kann koma okkum til størri nyttu sum frá líður.

Sjómannadagurin 2006:

# Enski trolaraskiparin Ken Knox undir Føroyum

**Okkara íkast til sjómannadagin verður ein framløga frá Hullskiparanum, Ken Knox, sum vit hava havt fleiri frágreiðingar frá í undanfarnum bløðum. Framløgan verður sunnudagin 20. august kl. 13. Sum vit longu hava sæð, dugur hann sera væl at greiða frá, so vit vænta, at tað verður stórur áhugi fyri tí, ið hann kann greiða frá.**

**Hesuferð prenta vit eina frásøgn um nakrar av hansara royndum undir Føroyum saman við eini frágreiðing um eina skakandi hending undir Íslandi, sum síðani førdi teir Føroyar. Fyrst greiðir Ken tó frá menningini av bretska trolaraflotanum aftaná seinna heimsbardaga.**



*Óli Jacobsen og Ken Knox í juni, tá Ken var her við ferðamannaskipinum "Black Prince".*



*Her síggjast teir báðir trolarar "St.Andronicus", høgrumegin, og "St.Amant". Á brúnni er Ken Knox. Hetta er sama túr, sum teir gjørdust fastir í vrakinum á "Ruebens".*

Aftaná seinna heimsbardaga varð framd ein fullkomin endurnýgging av fiskivinnuni í Bretlandi. Undir krígnum vóru nógvir trolarar tiknir at nýta til hernaðarendamál, og teir, sum vóru eftir, tá kríggið endaði, vórðu latnir eigarunum aftur, so teir aftur kundu fara til tað meira friðarligu fiskiveiðuna.

Nú var aftur møguligt at fara á fiskileiðirnar við Noreg, Ísland, Føroyar og Grønland, har nógvur fiskur var at fáa, sum kundi nøkta tørvin hjá fólkinum heima fyri góðum og sunnum mati. Eftirspurningurin eftir fiski var stórur og eisini eftir toskalivur, og hetta ávirkaði prísin á fiskinum tann rætta vegin.

Frá 1945 og nøkur ár fram sást ein sera stór broyting í fiskivinnuni – serliga í Hull og Grimsby. Sama hendi eisini í øðrum býum, men Hull og Grimsby gingu klárt á odda. Ein stór broyting var, at trolararnir skiftu frá at vera kolfýrdir til oljufýring. Afturat hesum fingu teir nú meira og meira framkomna útgerð so sum radar, sum var uppfunnin undir krígnum, ekkolodd, betri umstøður til manningina og betri sjókort. Trolini gjørdust eisini meira fiskilig til skaða fyri stovnarnar. Hugburðurin var, at nú skuldu veiðast og tað við lít!

**Føroysku leiðirnar avmarkaðan áhuga í fyrsta umfari**

Í fyrsta umfari var ikki tann stóri áhugin fyri føroysku grunnunum hjá hesum nýggju og skjóttgangandi trolarum, sum sigldu 12-14 míl. Við at sigla bert nakrar fáar tímar afturat, kundi teir troyta grunnarnar við Ísland, har fiskiskapurin var nógv betri. Tað sama var galdandi viðvíkjandi Grønlandi og Noregi. Víst tók ferðin eitt sindur meira av tíð, men tað var altíð vissa fyri at fáa túr inn.

Eg byrjaði sum fiskimaður 7. mars í 1951, og var hetta ikki júst tann besta árstíðin at byrja eina tilveru á sjónum langt heimanífrá. Tá var tað eisini greitt, at náttúrliga leiðin gekk til íslendsku og norsku grunnarnar. Seinni gjørdist gongdin tann, at teir smærru trolararnir við minni maskinorku – summir av teimum fýrdu enn við koli – fóru at leita til leiðirnar við Føroyar og til leiðirnar norðan fyri Skotland. Nógvir skiparar úr Aberdeen, Fleetwood og Grimsby komu at kenna leiðirnar undir Føroyum sera væl. Nógvar av fiskileiðunum hava nøvn, sum vórðu givin teimum av bretskum skiparum.

**Føroyar komu væl við**

Føroysku leiðirnar vóru til tíðir av stórum týdningi – eisini fyri skiparar á teimum stóru trolarunum. Hesar kundu eisini vera okkara bjarging. Á vetri var ofta sera ringt veður undir Íslandi og eisini á siglingarleiðini upp hagar. Tá kundu vit við eini lítlari kósbroyting koma í lívd av Føroyum, og tað varð eisini siglt millum oyggjarnar á vegnum til Íslands. Tá kundi tað gerast so mikið slætt í sjónum, at møguleiki var fyri at umvæla reiðskap, gera skipið fiskiklárt og annað slíkt, sum skuldi gerast á eini reisu. Onkuntíð varð eisini lagt stilt fyri at fáa hetta arbeiði gjørt. Tá máttu allar hendur arbeiða.

Nógvir skiparar, eisini eg sjálvur, hava mangan – aftaná vánaligan fiskiskap undir Íslandi, kastað trolið undir Føroyum á veg heim, og hevur hetta ofta bjargað túrinum. Hetta kallaðu teir "a drag out". Onkuntíð kundi ein skipari eisini fáa boð frá reiðaranum um at steðga nakrar dagar fyri at bíða eftir betri marknaði heima. Vóru teir tá á heimveg, varð farið undir Føroyar at veiða, til tíðin passaði at fáa besta prísin á marknaðin.

Eg minnist ein av teimum kendu skiparunum úr Hull í reiðaríinum Hudson Brothers Trawling Company. Nøvnini á øllum teirra skipum byrjaðu við "Cape". Hesin skiparin sigldi einaferð fram við Føroyum og hevði ekkoloddið gangandi. Tá sá hann, at tað skrivaði nógv. Hann purraði manningina út í stundini, og teir kastaðu. Trolið varð skjótt fult av toski og upsa. Teir fingu uppí eftir nøkrum fáum døgum, og túrurin var bara 9 dagar langur, tá teir landaðu. Hann gjørdi tríggjar eins góðar túrar út í eitt, og nógvir aðrir skiparar royndu – uttan úrslit – at finna tey tóvini og tær leiðirnar, har hann hevði fiskað. Bert fá ár seinni hevði tað ikki verið gjørligt at hildið hetta dult, tí tá varð kravt av reiðaríi og trygging, at teir skuldu boða frá position tvær ferðir um samdøgrið.



*Soleiðis lýsir Ken Knox við eini tekning støðuna, tá teir gjørdust fastir í vrakið.*

**Ein vandaferð**

Míni fremstu minni sum skipari undir Føroyum eru frá apríl 1968. Eg fiskaði fram við 100 favna kurvini á Hvalabakinum í ein landsynning úr Íslandi. Her lógu um 20 trolarar á somu avmarkaðu leiðini, og veiðan var upp til 100 kurvar um dagin av toski og hýsu.

Men so komu vit so illa fyri, at trolið kom fast í vrakið av einum belgiskum trolara, sum lá á umleið 120 favna dýpi. Í 18 tímar gjørdi eg alt, eg kundi fyri at fáa trolið leyst, men uttan úrslit. So




*Ken Knox hevur eisini teknað eitt brot av sjókortinum fyri Hvalabakið, sum liggur beint við gamla íslendska 12 fjórðinga fiskimarkið. Her sæst eisini, hvar vrakið hevur ligið. Sum tað sæst, hava bretskir skiparar dugað væl at tekna upp tær eygleiðingar, sum teir hava gjørt.*

løgið var tað, at skipið, har trolið var fast, "Reubens" var systirskip til trolaran, eg var við, "St. Andronicus". Hann var nevniliga keyptur úr Ostende í Belgiu. Nú kundu hinir skipararnir síggja, hvar vrakið lá, og hetta gav teimum møguleika at koma nærri uttan at koma fastir, og hesum fingu teir nógv burtur úr. Sjálvur kundi eg bert hyggja at.

At enda slitnaði tann fremri veirurin, so vit hingu í veirinum í aftara gálga.

"St. Andronicus" gjørdist nú óstøðugur við allari vektini av trolinum hangandi í aftara gálganum, og tað gjørdist sera trupult at manøvrera, og støðan gjørdist sera trupul eisini tá hugsað varð um ábyrgdini av 20 monnum umborð.

Nú fór alt at ganga galið "All hell let lose". Við trolinum hangandi í gálganum stóð skipið 15-20 stig upp og niður. Knappliga fór skipið av sær sjálvum at bakka suðuryvir og við sjógvi skolandi inn yvir stýriborðs lúnning fór ferðin á skipinum upp, og tað helt á við at bakka við eini ræðandi ferð, hóast vit sigldu fulla ferð fram.

Tað var heilt ógjørligt at stýra, og eg fekk einki annað gjørt enn at koyra róðrið for út í stýriborð fyri at royna at minka um ferðina

"St. Andronicus" var nú eitt skip, sum eingin hevði ræði á.

Vit høvdu gjørt alla bjargingarútgerðina klára og vóru farnir í bjargingarvestarnar. Hinir trolararnir á leiðunum varnaðust okkara støðu og háløðu, so teir kundi koma okkum til hjálpar.

Eg lurtaði eftir VHF-inum, meðan eg royndi at bjarga skipinum, og hoyrdi hinar skipararnar tosa um, hvat ið mundi vera hent.

Ein møguleika, teir umrøddu, var, at vrakið av "Ruebens" kundi vera farið á glið av hellingini niður á djúpari vatn, og at tað togaði okkum við sær.

Vit vóru nú komnir suður um allar trolararnar, og tað, eg hugsaði mest um, var trygdarstøðan hjá manningini og skipinum. Vit máttu bíða við at fáa greiðu á, hvør orsøkin var til, at vit vórðu drignir soleiðis avstað. Stýrimaðurin var sera skilagóður at fylgja mínum boðum um ikki at seta bremsurnar á spælinum fastar, men at lata tær loysa seg sjálva. Stýriborðsveirur rann spakuliga út. Hetta gjørdi tað truplari at kvetta veirin við teimum ísøksunum, vit høvdu umborð. Ein onnur óvissa var, at eg ikki visti, um veirurin var sjekladur fastur í trumluna, ella um hann bert var "bregdaður" á hana.

Hvat enn hetta var, so kundi tað hava vanlukkuligar avleiðingar fyri okkum allar.

Endiliga fór ferðin at minka. Ekkoloddið vísti, at dýpið var 280 favnar. Neistarnir fuku úr rulluni í gálganum. Men so var knappliga ein hvøllur brestur, og veirurin slitnaði.

Trolarin ristist og skalv og kom so aftur á rættkjøl. Hetta var ein ótrúligur lætti fyri okkum allar, og eg dugi ikki at siga, hvør ið best lat tað koma til sjóndar.

Allir fingu nú ein væluntan løgg av romm, og vit fingu møguleikan at koma fyri okkum aftur eftir hendan hvøkkin. Síðan tosaðu vit um, hvat ið mundi vera hent, og hvat ið vit nú skuldu gera.

Bert 20 longdir av veiri vóru eftir á bakborðs trolspælinum; tær vóru 25 favnar hvør. Átta longdir vóru mistar. Bert 4 longdir vóru eftir á stýriborðs trumluni, 24 vóru mistar. Allur annar reiðskapur var farin í havið. At fara at dreggja eftir reiðskapinum var ikki hugsandi um, orsakað av "Ruebens" vrakinum.

Manningini tørvaði 24 tímar at gera nýggjan reiðskap til burtur úr tí tilfari, sum vit høvdu umborð. Men hetta var so mikið lítið, at vit fóru at vera avmarkaðir til at fiska á 50-90 favna dýpi við tí veiri, sum var eftir umborð og hetta var ov lítið til veiðu undir Íslandi.

**Loysnin: Til Føroya**
Eg hugsaði um støðuna og gav so boð um at sigla við fullari ferð til Føroya, har vit kundi gera túrin lidnan. Veðrið var gott. Samstundis varð øll manningin sett til at gera reiðskapin til av nýggjum. Tó kundu tveir mans sova í senn, so teir kundu skiftast at hava eitt sindur av frívakt.

Nýggir lemmar og bobbens máttu riggast til, áðrenn vit kundu fara at gera trol og rigga veirin til av nýggjum.

Til alla lukku høvdu vit trý eyka sett av 40 favnar breidlum, og tvey av hesum settunum vórðu nýtt at skoyta uppí trolveirin. Hetta gav okkum betri møguleika at trola á djúpari vatni enn vit annars høvdu kunnað havt.

Sjálvt aftaná at hava brúkt væl av tíð at sigla til Føroyar, vóru vit als ikki klárir at kasta, tá vit komu higar. Vit komu á leiðirnar í ein landnyrðing við kós suðureftir og fóru at hyggja eftir, um vit sóu nakran trolara, sum fiskaði, so vit kundu fáa eina ábending um, hvar tað loysti seg at kasta. Vit komu fyrst á Fugloyar Bankan og síðan á Nólsoyar Bankan, áðrenn vit sóu skip á radaranum átta míl frá okkum. Í kikaranum helt eg, at hetta kundi vera ein trolari, og av tí at hann flutti seg seint, mátti hetta merkja, at hann tóvaði. Tá vit komu nærri, sá eg, at hetta mátti vera ein føroyskur trolari, sum togaði vestantil á Sandoyar Bankanum. Eg minnist tó ikki navnið á honum. Aftaná, at eg úrslitaleyst hevði kallað á hann á fleiri kanalum á VHF-inum, kom eg til tað úrslit, at skiparin neyvan dugdi enskt. Tað var framvegis ein tími til vit kundu kasta, og eg sigldi spakuliga fram við føroyska trolaranum og kundi staðfesta, at hann fiskaði á 80-90 favna dýpi, og var hetta júst nóg mikið til veirin, sum vit høvdu. Eg kundi staðfesta nøkur ýti, sum vit eisini kundu halda okkum til. Onkur veittraði til okkara av brúnni á føroyska trolaranum.

**Vit kasta**
So komu boðini frá stýrimanninum "All ready skipper", og so kastaðu vit. Við bert helvtini av tí veiri, sum vit vanliga brúktu, høvdu vit ikki ráð at koma fastir aftur. Vit vóru hampiliga væl útgjørdir við sjókortum, sum góvu nógvar upplýsingar um ringan botn, sum tað eisini sæst á tí sjókortinum, vit áður hava prentað. Fyrsta tóvið vardi í fýra tímar. Hetta gav okkum møguleika til eina stutta frívakt. Tá vit háløðu, vóru 60 kurvar í ella beint omanfyri eitt hálvt tons av toski, hýsu og upsa. Vanliga gjørdu vit 7-8 tóv, so hetta var ein hampiliga góð veiða.

Tveir dagar togaðu vit aftur og fram á somu leið og fingu í miðal 40-50 kurvar í hvørjum tóvi uttan at koma fastir ella at missa nakran reiðskap.

Okkara føroyski vinur var farin av leiðini longu fyrstu náttina, so eg kundi ikki veitra farvæl til "mín tigandi partnara", og síðan fóru vit eisini heim.

Eg fari altíð at minnast Føroyar – og serliga Sandoyar Bankan, ið góvu mær mangar løtur við stillisligum og friðarligum fiskiskapi.

Vit koma at frætta meira frá frá Ken Knox í komandi bløðum.




*"St. Achilleus", sum er eitt av systirskipunum hjá "Ruebens" og "St. Andrenicus". Hesir vóru bygdir til eitt belgiskt reiðarí og síðan seldir til Hull. Hesir trolarar vóru kendir fyri at vera ring sjóskip. Eitt av teimum "St. Romanus" snøgt sagt hvarv í einum ódnarveðri.*

Sjómannadagurin:

# Íkastið hjá Føroya Fiskimannafelag

Í blaðnum í dag er lýst tann neyva skráin fyri sjómannadagin 19. august ella nærri sagt sjómannadagarnar, tí skráin gongur heilt frá 16. til 20. august. Í veruleikanum gongur skráin frá 15. august, tá Føroya Banki skipar fyri einum eftirlønartiltaki, sum greitt er frá aðra staðni í blaðnum.

Tann stóri dagurin verður 19. august við m.ø. einum hópi av ymiskum kappingum, so her verða uttan iva fleiri nýggir heimsmeistarar.

Feløgini hjá veiðuliðinum koma eisini at hava síni íkøst. Fríggjadagin 18. august kl. 14 verður fiskivinnuráðstevna við forvitnisligum luttakarum.

Íkastið hjá Føroya Fiskimannafelag verður sunnudagin kl. 13 í Skálanum.Tá verður framløga av einum fyrrverandi enskum trolaraskipara, Ken Knox. Hann hevur fiskað eitt heilt lív og hevur verið við í mongum vasi, sum t.d. toskakríggini.

Í hesum sambandi hevur hann eisini havt samband við Føroyar og føroyingar. Í 50-unum var hann á saltfiskaveiði við enskum trolarum undir Grønlandi, har føroyingar vóru við at læra teir at flekja. Í blaðnum í dag hava vit eina frásøgn hjá honum um enska veiðu undir Føroyum, og hann hevur eina dramatiska frásøgn um eina hending, sum førdi teir á okkara leiðir.



*Her er trolposin flotnaður fullur av toski.*



*Toskurin verður tikin inn posa fyri posa.*



*Dekkið er fult av fiski.*



*Her er ein portugisisk doria komin at borði.*

Sigast kann, at hann hevur givið eitt heilt fitt íkast til okkara fiskivinnusøgu.

At hann er í Føroyum júst tann 20. august, er ein heppin tilvild. Í summar hevur hann verið tveir túrir við stuttleikaferðamannaskipum, har tað hevur verið hansara uppgáva at greiða ferðafólkunum frá teimum leiðum, har skipini hava siglt. Hetta hevur so eisini náttúrliga ført til at greiða frá fiskiskapi eisini. Í hesum sambandi er hann komin í samband við FF, og hava vit kunnað gjørt okkurt hissini at útvega honum upplýsingar.

Tann fyrra túrin vóru teir á Havnini 24. juni, og hesa ferð kemur Ken á Havnina á morgni 20. august. Hetta gevur júst tíð til at koma til Klaksvíkar við sínum boðskapi. Ken Knox er eisini formaður í bretsku fiskimannamissiónini, Royal National Mission to Deep Sea Fishermen, og hann kemur at bera eina heilsan frá teimum á sjómannagudstænastuni, sum verður í Christianskirkjuni sama dag kl. 11.

Kl. 13 verður so hansara framløga í Atlantis Bio. Tað er ikki heilt vist enn, hvat hann fer at greiða frá, tí hann hevur ein hóp av tilfari. Eitt evni, hann nevnir sum ein møguleika, eitur: "Wars with and withour medals", "Kríggj við og uttan medaljur", og verður her fyrst og fremst víst til toskakríggini undir Íslandi. Framløgan, sum verður við myndum, verður eisini týdd til føroyskt.

Tað kann verða nevnt, at vit hava fingið frá honum eina fløgu um portugisiskan fiskiskap við doryum undir Grønlandi og Canada. Hetta er eisini eitt spennandi evni, sum vit føroyingar kenna nógv til og verður henda fløgan møguliga eisini víst.

Undir øllum umstøðum er Ken Knox ein spennandi persónur, sum veit nógv um fiskiskap. Tað er heppið fyri sjómannadagin, at hann er í Føroyum júst hendan dag. Vit vænta at síggja nógv fólk til hetta tiltak.

Vit endurgeva nakrar av myndunum, sum Ken hevur úr Grønlandi, og minna tær okkum eisini um eina farna tíð.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu
og hjálp, tá kæri maður, pápi, verðfaðir,
abbi og langabbi okkara

**Haakon Frimodt Joensen**
Tórshavn, ættaður úr Sumba

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vitjaðu hann,
meðan hann lá á Landssjúkrahúsinum,
tøkk til starvsfólkið á B6.

Tøkk til tykkum, sum minntust hann
við blómum, kransum, fjarritum,
telefonsamrøðum og vitjanum.

Tøkk til Berg Joensen, prest, fyri
troystarrík orð og vakra røðu til jarðarferðina.

Eisini vilja vit takka berarum, sangarum,
tykkum sum hjálptu við til ervi og øllum
tykkum mongu, sum fylgdu Haakon
til hansara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

***Solveig, Sigrun, Marjun
og Hans Petur við familjum***




**Her er alibáturin hjá Bakkafrost, sum mánadagin 7. august fann grindina, sum legði beinini í Syðrugøtu.**

**Meðan aðrir bátar sleipaðu hvalirnar til bryggjuna í Norðragøtu, so høvdu hesir tikið 6 hvalir inn á dekkið við kranunum.**

Andrias gjørdi skjótt av:

# Bjargaði manni við "Havborg"

**Beint undan Ólavsøku frættist, at eldur var komin í verksmiðjuna á rækjutrolaranum "Havborg", sum hann lá inni í Tromsø og gjørdi klárt til at fara nýggjan túr eftir at hava landað veiðuna frá undanfarna túri.**

Tað frættist eisini, at eingin mannskaði hevði verið, og var hetta gleðiligt. Men tað kundi havt verið galið, og tað var ein skjótur atburður hjá einum av manningini, Andrias Thomsen, sum forðaði fyri, at tað ikki endaði so galið, sum tað kundi havt gjørt.

Vit hava prátað við Andrias, og hevur hann greitt okkum frá tí, sum hendi. Fyrst er at siga, at Andrias er 26 ára gamal. Hann er sonur Hendrik Thomsen, ættaður úr Syðrugøtu og Jónu, sum er úr Havn. Andrias er uppkallaður eftir abbanum "í Køkubúðini". Hann er royndur við rækjutrolarum. Hann sigldi við "Sólborg" sum dekkari í 1997-98. Hann fór tá í læru sum maskinsmiður, og fór hann á maskinskúla, har hann fekk prógv sum maskinistur. Hann kom umborð aftur í "Sólborg" sum maskinmaður í 2004 og var við har, til skipið varð selt av landinum seinasta summar.


*Andreas Thomsen.*

Seinasta heyst fór Andrias við "Havborg" sum maskinmaður. Hann hevði júst havt frítúr og var saman við øðrum av nýggju manningini komin yvir til Noregs at fara nýggjan túr.

Andrias sigur, at teir høvdu sitið og prátað í messuni um kvøldið. Teir flestu av manningini vóru farnir í land, og teir vóru fýra eftir umborð. Tveir vóru farnir í koyggjuna, og kl. 22 fór Andrias í kamarið uppá at tørna inn.

Tá hoyrist brandalarmurin, og Andrias loypir upp. Tá sær hann, at tað brennir í verksmiðjuni uppi undir dekkinum, har tilfarið er plátur úr timbri.

Tað er ikki annað at gera í fyrsta umfari uttan at fara uppá kajuna, og higar koma fyrst teir tveir, sum ikki vóru inntørnaðir. Rópt varð eftir hinum, men tað er bert annar teirra, sum ger vart við seg, og sum eisini kom upp á kajuna.

Tað var eitt sindur ógreitt, um onkur annar kundi vera umborð, men teir vistu so um ein av manningini, sum svav í mittasta kamarinum, sum lá á hædd við troldekkið, og honum frættist einki frá.

Her mátti berast skjótt at. Umframt, at tað var nógvur eldur, sum spreiddi seg skjótt, var eisini nógvur roykur, og hann er sum kunnugt lívshættisligur. Andrias loypur upp á brúnna, har roykkavaraútgerðin er goymd. Hann letur seg í masku og iltfløskur. Hann fer so niður gjøgnum trappurnar og fram til mittasta kamarið á dekkinum, har maðurin búði. Tað var nógvur roykur í geinginum, men Andrias sleppur inn á kamarið, har tað enn er minni av royki, og har maðurin framvegis liggur og svevur. Her er talan um skjóta útpurring, og nú var at bera skjótt at, og báðir koma uppá kajuna í øllum góðum og útpurraði maðurin uttan at vera ílatin. Teir fóru á sjúkrahús at verða kannaðir, og her varð staðfest, at teir ikki høvdu fingið nakað mein av roykinum.

Annars varð eldurin skjótt sløktur av sløkkiliðinum, sum varð tilkallað, og sum gjørdi sera skjótt av.

Tað er eingin ivi um, at tað er eitt bragd, sum Andrias hevur gjørt. Tað mest avgerandi her var, at so skjótt varð atborið. Mett verður, at bert 2 minuttir seinni hevði tað verið ov seint, og maðurin hevði doyð av roykeitran. Roykurin hevur verið so nógvur, at fleiri kømur eru oyðiløgd.

Men Andrias visti eisini hvat hann skuldi gera. Ein partur av útbúgvingini er eisini roykkavaraskeið við Áir, og hetta hevur givið førleikan til at gera tað rætta í eini slíkari støðu.

Hetta hevur uttan iva verið ein skakandi uppliving, men Andrias hevur ikki havt marruna aftaná, og hevur hendingin tískil ikki fingið nakra sálarliga aveiðing.

Men marruna kann ein hava við at hugsa um, hvat ið kundi hent, um slíkt hendi til havs ella um tað hendi, eftir at øll manningin var komin umborð og lá og svav! Hetta má sanniliga geva avvarðandi myndugleikum høvi til at taka neyðug stig at forða fyri, at slíkt yvirhøvur kann henda.

Andrias var við til at sigla "Havborg" heim aftur, og hann er til reiðar at fara avstað aftur, tá skipið er umvælt um nakrar mánaðir.

Andrias er so beskeðin, at hann heldur ikki at henda hending er nakað at gera nakran háva burtur úr. Men skiparin á "Havborg", Dan Joensen, ivast ikki, tá hann metir, at hetta er eitt rættuligt bragd, sum Andrias hevur framt.




Økingin í ES rækjukvotuni:

# Ov seint!

**Bjarni Petersen**

Herfyri komu sum stórtíðindi, at føroyingar høvdu gjørt broytingar í handilsavtaluni við ES. Tað, sum eg hefti meg við, var, at kvotan fyri tollfælsi á pilkaðum rækjum var hækkað við 3.000 tonsum.

Millum annað var løgmaður endurgivin fyri at siga, at hann serliga fegnaðist um hendan partin av avtaluni.

Tá ein sum lurtari hoyrir slíkt, og kanska á hasum økinum hevur eitt pinkalítið ánilsi um, hvat tað snýr seg um, so veit ein ikki, um ein skal grína ella gráta.

Ikki verður ikki nevnt við einum orði, at einasta føroyska rækjuvirkið als ikki pilkar rækjur longur. Tískil hava vit als ikki brúk fyri eini slíkari avtalu, sum støðan er.


*Bjarni er skipari á rækjutrolaranum "Arctic Viking".*

Enntá varð sagt, at ES snildisliga eisini hevur tryggjað seg, at um henda kvota ikki bleiv brúkt, sum hon sjálvsagt ikki verður, so fellur hon burtur aftur. Tá eru vit aftur í somu støðu, um tað nú skuldi hent seg, at vit aftur fara at pilka rækjur.

Tað sær tískil út, sum um ES fylgir betur við hjá okkum, enn vit gera sjálvir.

At fáa hækkað hesa rækjukvotu var eitt ynski, sum rækjumenn hava havt í nógv ár. Men nú flestu rækjuskip eru farin á heysin, kom henda avtala um 5 ár ov seint.

Tað, sum undrar meg mest, er, at als eingin tíðindamaður er vaks og setir spurnartekin ella hevur nakra sum helst viðmerking til hendan partin av hesi avtalu. Teir kundu t.d. spurt rækjuvirkið, um hvat hetta "frambrot" hevur at týða fyri teir.

Vónandi verður tað tó so, at hetta broytist, og pilkirækjurnar aftur koma í ein prísklassa, sum hann hevur verið. Vit hava áður sæð stórar prísbroytingar innan stutta tíð, sum t.d við laksa- og hvítfiskaprísunum.

Annars kann eg ikki lata vera við at gera eina lítla viðmerking til hesar skipasølur, sum hava verið seinastu tíðina, og har reiðarar hava fingið eitt sera gott avkast av sínum íløgum.

Hetta verður lagt út, sum at her er nakað rívandi galið, og løgtingsmenn arbeiða sum óðir at broyta lógir og annað.

Vit kunnu ímynda okkum, at hetta var mótsett, og at Eiler og aðrir vóru farnir á reyvina við 300 mill. í skuld á staðin. Tá ivist eg ikki í, at man hevði sagt, at hetta er í fínasta ordan. Eingin hevði tosað um at broytt lógir o.a., men tað hevði verið sagt: "Eg segði tað altíð, hatta kundi ikki ganga".

# Tak

**til deltagerne i familietræffet "á Skipanesi" den 15. juli**

Det var med stor glæde, jeg genså de mange kendte ansigter, genopfriskede erindringen om mange, jeg næsten havde glemt, og hilste på mange, jeg ikke havde truffet tidligere.

Skønt mor for over hundrede år siden – kun 18 år gammel – rejste ud i verden, glemte hun aldrig sin oprindelse. Lige fra barn lærte jeg at forstå det færøske sprog, for mange færinger gæstede vort hjem for kortere eller længere ophold. Omvendt var jeg meget på Færøerne i mine yngre år.

Nu er hengået lang tid siden vi i 1956 forlod Færøerne efter at have arbejdet der i nogle år. Besøget i år – efter 50 år – har været en stor oplevelse. Alt er så forandret og alligevel er alt så velkendt. Mest betagende var dog familietræffet med det store fremmøde af både nærmere og fjernere slægtninge. Tak til alle!

En særlig tak til Jórun, Peter Meinhard og familie for gæstfrihed og den indsats, de iøvrigt har ydet i anledning af det vellykkede familietræf.

*Birgit og Arne Dinesen*

# Nøvn á myndum

**Í seinastu bløðunum hava vit havt nakrar myndir av fiskimonnum. Vit hava fingið nøvn til fylgjandi myndir:**



*Tv. Klæmint Clementsen, Syðradal.*

*3350F03225*



*Sigurd Andreassen, Leirvík*

*3350F03226*



*Til høgru: Jákup Klein, á Fløtunum, Strendur*

*3350F03228*



*Frá vinstru niðast Jóan Hendrik Olsen (Hendrik á Bug) Fuglafjørður, Stóri Óli í Gøtugjógv, Óla Hans Olsen Syðrugøtu. Aftanfyri frá vinstru Elias Petur Olsen Gøtugjógv, (búði niðri eftir seinna kríggj), Olivur Olsen (Olivur í Tøvuni), Gøtugjógv. Jóan Hendrik, Olivur, Elias Petur og Óla Hans vóru brøður, synir Stóra Óla. Myndin er helst tikin umborð á Fame umleið 1925 ella har á leið.*

*3350F03230*



*Jákup Nielsen, úr Nólsoy*

*3350F03217*



*Marius Olsen, í Ovasta Húsi, Skálavík, f. 1909.*

*3350F03223*

# Gamlar manningarmyndir

**Her eru tvær gamlar manningarmyndir afturat. Vit vilja framvegis sera fegin frætta, um nakar kennir menninar á myndunum. Tað er Føroya Fornminnissavn, ið eigur myndirnar.**



*3350F03231*



*3350F03232*




# Tín staðgongumaður

**"...er tað tá mær, tit leita eftir, so latið hesar fara."**

***Joh. 18,8***

Jesus segði hesi orð skíriskvøld í Getsemanne urtagarði. Tey vórðu søgd við hermennirnar, sum við Judasi á odda, komu við lompum, svørðum og gøssum fyri at taka Jesus.

Jesus hevði strítt sítt sálarstríð – og vunnið. Sum altíð, so hevði hann lagt lív og vilja sín í Faðirsins hendur: "Faðir mín, um tað ikki er gjørligt, at henda skál kann ganga um meg, uttan at eg skal drekka hana, tá verði vilji tín!" *Matt. 26,42*

Jesus hevði vitað um hesa løtu, áðrenn hann kom inn í henda heim. Hann visti, at skuldi mannaættin frelsast, mátti hann ganga henda vegin – til enda. Hann visti, at hann var tann góði hirðin, sum skuldi seta lívið til fyri seyðirnar. Hann visti, at hetta var Guds vilji, og tí gjørdi hann onga mótstøðu.

At doyggja ein sáttardeyða á einum krossi var endamálið við komu hansara.

Tí kundi hann hyggja alskin og vinaliga uppá hermenninar og siga: "...er tað tá mær, tit leita eftir, so latið hesar (lærusveinarnar) fara!"

Við hesi útsøgn boðar Jesus kjarnina í gleðiboðskapinum. "Takið meg – latið hesar fara. Sláið meg – men ikki lærusveinarnar. Krossfestið meg – men ikki hesar. Drepið meg – men latið lærusveinarnar liva!" Orðini runga og anga av kærleika, fyrigeving, umsorgan og frelsu.

Tað var ikki bara frelsu lærusveinana, Jesus hugsaði um og stríddist fyri hetta kvøldið.

"Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív." *Joh. 3,16*

Jesus offraði seg fyri alla mannaættina. Tí kanst tú seta títt navn inn ístaðin og endurtaka Jesu orð: "Takið meg – latið .... fara!"

Jesus bar sjálvboðin tín kross. Sjálvboðin gjørdist hann tín staðgongumaður. Sjálvboðin varð hann revsaður í títt stað. Hann bløddi sjálvboðin fyri at strika út tínar og allar syndir heimsins.

Hann, sum gav lív sítt fyri teg, ynskir nú, at tú gevur honum lív títt – allan teg.

Tøkkin, Jesusi leingist eftir frá tær, er ikki bara orðið "tøkk", men at alt lív títt verður ein tøkk, ein dýrmetan og eftirfylgjan av honum.


VID FØROYA BANKA
Á SJÓMANNADAG
Føroya Banki bjóðar til fund um eftirløn á Sjómannadegnum.
Fundurin, ið er ætlaður fólki í fiskivinnuni, verður hildin í
Skálanum í Klaksvík týskvøldið 15. august kl. 19.30.
Á fundinum fara fleiri serkøn fólk at varpa ljós á pensjóns-
og eftirlønarviðurskiftini hjá starvsfólkum í fiskivinnuni
bæði á sjógvi og landi.
Tilmelding:
Tey, sum ætla sær við á fundin, skulu boða frá luttøku áðrenn
11. august kl. 13.00 við at ringja 45 63 77 ella senda teldupost til
anna.maria.ragnarsson@foroyabanki.fo
FØROYA BANKI


Vit hava stórt úrval
av fiskireiðskapi
til línu og snellu
Svævlalínu frá 3,5 til 9 mm. Tit avgera sjálv,
hvussu langt skal vera millum svævlarnar.
Húkar í ymsum støddum og sniðum. Rippaðir og órippaðir.
Teymar frá nr. 4 til 20 í fleiri litum.
Eisini eru handlarnir fullir av klæðum til sjó- og arbeiðsfólk.
Frá innast til uttast.
TEYMAVIRKIÐ
SNØRISVIRKIÐ
GLÆMAN


Føroya størsti
veitari til ídnað
og vinnu
Pakningur úr kartong, bylgjupappi
og tjúkkum pappi, plastikki og
øðrum tilfari til ídnaðarlig endamál.
Vit útvega eisini: Plastvørur • Pakkiútgerð
Maskinur • Arbeiðsklæði Trygdarútgerð •
Knívar • Tilsetning • Sekkir • Plattar • Vaskievni
Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari
...sjálvandi til besta prísin!
FARPACK
www.farpack.fo

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingarøvtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569

**Tilboð í sambandi við sjómannadagin:**

FF-BLAÐIÐ
ÓKEYPIS
RESTINA AV ÁRINUM

Í samband við sjómannadagin vilja vit bjóða nýggjum haldarum at fáa blaðið ókeypis restina av árinum. Haldaragjaldið kr. 250 verður tá galdandi heilt fram til ársenda 2007.

FF-blaðið er fyrst og fremst blaðið hjá fiskimonnum. Einki annað blað verjir teirra áhugamál.

Afturat hesum er FF-blaðið eitt øðrvísi blað. Tað er eingin vandi fyri at finna sama tilfar í FF-blaðnum, sum í hinum fjølmiðlunum.

Tey eru fleiri sum ikki halda onnur bløð og sum meta FF-blaðið at vera besta blað í Føroyum.

FF-blaðið kann fáast fyri kr. 250 fram til árslok 2007. Tískil er tað ókeypis restina av árinum 2006.

Tað ber til at tekna seg sum haldara á sjómannadegnum, og annars við at venda sær til:

tlf 311569 - fax 318769
ella á teldupostin:
ff-blad@post.olivant.fo

Tað ber eisini til at kunna seg um blaðið á okkara heimasíðu:

www.fiskimannafelag.fo

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



# Lómstein ættarstevna

Tann 15. juli hittist Lómstein-ættin. Hetta eru eftirkomarar hjá Eriku og Høgna Lómstein í Syðrugøtu. Høgni var sonur Onnu Sofiu og Jóan Fredrik á Kletti í Norðragøtu, og Erika var dóttir Julionnu og Johan Salomon fyri oman Oyruna í Syðrugøtu. Her kann verða nevnt, at so væl Jóan Fredrik sum Johan Salomon vóru millum teirra, sum tóku stig til at stovna Fiskimannafelagið í 1910.

Tey bæði fingu 10 børn, og hjá teimum flestu teirra eru eftirkomarar, so tað var ikki hissini samkoma, sum hittist hendan dagin lutvíst á Svangaskarði og lutvíst í barndómsheiminum í Syðrugøtu, sum framvegis er í ættini.

Av hesum 10 systkjunum eru tvey deyð, nevniliga Finnur og Oddvør, og av teimum 8, sum eru eftir, vóru 7 við á samkomuni, sum eydnaðist sera væl, ikki minst takkað veri tí frálíka veðrinum hendan dagin.

Vit vísa nakrar myndir frá samkomuni.



*Tað vóru eftirkomarar hjá Eriku (1909-1962) og Høgna (1907-1987), sum hittust hendan dagin. Tað er ikki ov nógv at siga, at ættin hevur spjatt seg til flestu heimspartar.*



*Her eru sjey av systkjunum. Aftanfyri f.v.: Sjúrður, Arnbjørn og Hanus. Frammanfyri: Jónhild, Friðgerð, Fríða og Óluva.*



*Tað er ikki hissini mannamúgva, sum er komin burturúr hesum sáttligu gøtufólkunum. Á myndini eru umleið 115 fólk. Samlaða talið av eftirkomarum við makum er 132.*

## dagsins MYND




**Hesir báðir hava valt eina heldur øðrvísi summarferiu. Teir eru saman við pápunum farnir á svartkalvaveiðu við grønlendska trolaranum "Polar Nanoq". Vinstrumegin er Teitur, sonur Julian Nolsø og høgrumegin er Hákun, sonur Hjarnar Dalsgaard.**